# ÁRSFRÁGREIÐING

# 2020

# FØROYA KÆRUSTOVNUR



Ársfrágreiðing 2020 hjá Føroya Kærustovni ©
Sniðgeving og umbróting: AnniJanni
Prent: Føroyaprent

# INNIHALDSYVIRLIT

1/ Inngangur ........ 5
2/ Kærustovnurin ........ 7
3/ Virksemið 2020 ........ 9
4/ Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum ........ 13
5/ Skatta- og avgjaldskærunevndin ........ 25
6/ Kærunevndin hjá Studna ........ 31
7/ Kærunevndin í lendismálum ........ 35
8/ Vinnukærunevndin ........ 41
9/ Psykiatriska Sjúklingakærunevndin ........ 47
10/ Skuldarumskipanarnevndin ........ 51
11/ Fjølmiðlanevndin ........ 55
12/ Høvuðsbarnaverndarnevndin ........ 59
13/ Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini ........ 71
14/ Kærunevndin hjá Barsilsskipanini ........ 75

# VIT FEGNAST UM, AT VIT HETTA ÁRIÐ HAVA FINGIÐ NÝGGJA HEIMASÍÐU

NÚ BER AFTUR TIL HJÁ OKKUM, MYNDUGLEIKUM OG BORGARUM AT LEITA Í AVGERÐARSAVNINUM OG HAR FÁA KUNNING UM SIÐVENJU OG GALDANDI RÆTT Á NÓGVUM YMISKUM ØKJUM.

# 1/INNGANGUR

Eins og í samfelagnum sum heild, hevur Korona havt sína ávirkan á arbeiðið á Kærustovninum farna árið. Starvsfólk hava í tíðarskeiðum arbeitt heimanífrá og starvsfólkahópurin hevur verið býttur upp í lið fyri at tryggja, at onkur altíð kundi traðkað til, um onnur vóru noydd í sóttarhald. Fyri at halda tilmælini um frástøðu, hava nógvir fundir verið hildnir uttan fyri stovnin, tí okkara fundarhølið er so lítið, at tað hevur ikki verið rúmd fyri øllum teimum, sum hava skula møtt í øllum málum. Dømi eru eisini um mál, har viðgerðartíðin er longd, tí trupult hevur verið at skipa fundir, har kærarar, sum hava verið staddir uttanlands, hava ynskt at møtt.

Hóast umstøðurnar ikki hava verið heilt vanligar, hevur avgreiðslan verið á sama støði sum undanfarnu trý árini. Innkomna málstalið er eisini á nakað sama støði sum árið frammanundan, tó so at býtið millum nevndirnar er ikki tað sama. Óvanliga nógv tilmæli hava verið latin Høvuðsbarnaverndarnevndini hetta árið og eisini hevur lutvíst stórur vøkstur verið í kærunum til Vinnukærunevndina. Hinvegin eru færri kærur latnar Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum og Kærunevndini í lendismálum. Og merkisvert er, at talið av umsóknum til Skuldarumskipanarnevndina er lægri enn nakað annað ár.

Tað er ein sannroynd, at okkara heimasíða í rúma tíð hevur trongt til endurnýggjan, millum annað tí hon ikki var sambærlig við nýggjari tøkni, men serliga tí avgerðarsavnið, sum er bulurin á síðuni, var blivið so stirvið. Tað tók so langa tíð at fáa avgerðirnar fram, at tað í veruleikanum ikki var brúkiligt. Vit fegnast tí um, at vit hetta árið hava fingið nýggja heimasíðu, og at aftur ber til hjá okkum, myndugleikum og borgarum at leita í avgerðarsavninum og har fáa kunning um siðvenju og galdandi rætt á nógvum ymiskum økjum.

Annars kann nevnast, at ein partur av orkuni hetta árið er farin til at fyrireika nýggju arbeiðsuppgávu okkara at hava um hendi skrivstovuvirksemi hjá nýggju Tvingsilsnevndini, sum fór til verka 1. januar 2021. Økið hjá Tvingsilsnevndini er víttfevnandi og nevndin skal bæði taka avgerðir um góðkenning av inntrivum og viðgera kærumál um inntriv. Inntrivini, ið eru fevnd av økinum hjá nevndini, eru bæði nógv og ymisk, og fevna tey m.a. um nýtslu av ávaringar- og peilingarskipanum, at halda persóni føstum í sambandi við reinføri, flyting uttan samtykki, forða fyri atgongd til internet, bert fyri at nevna nøkur úr rúgvuni.

Afturat øllum hesum, so hevur Tvingsilsnevndin eisini ávísar uppgávur í sambandi við at føra yvirlit yvir avgerðir um góðkenning, móttiknar fráboðanir og frágreiðingar.

Endamálið við lógini er m.a. at skipa heimildargrundarlagið fyri tvingsli og góðkenning av tvingsli, galdandi fyri starvsfólk og persónar, ið eru fevndir av løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og løgtingslóg um barnavernd. Væntandi fer henda nýggja uppgáva at fylla nógv og hava rímiliga stóra ávirkan á virksemið hjá Føroya Kærustovni framyvir.

Tórshavn, mars 2021

Anja Hovgaard
*stjóri*

# 2/KÆRUSTOVNURIN

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni er at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum.

Fyri tað fyrsta er tað fyrireikingin av málunum til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Studna, Kærunevndina í lendismálum, Vinnukærunevndina, Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina, Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Kærunevndina hjá Barsilsskipanini, sum stovnurin tekur sær av.

Kærustovnurin tekur sær av skrivstovuvirkseminum hjá nevndunum. Stovnurin móttekur kærurnar, skrásetir tær, sendir tær til ummælis og hoyringar hjá avvarðandi myndugleikum og møguligum triðju pørtum. Tá málið er fult upplýst, verður løgfrøðiligt upprit við tilmæli til niðurstøðu gjørt, og verður hetta saman við skjalatilfarinum í málinum sent nevndarlimunum. Innkallað verður til fundar, og tá kærunevndin hevur tikið avgerð, avgreiðir Kærustovnurin avgerðina til kærara og avvarðandi myndugleika.

Avgerðirnar hjá kærunevndunum verða síðani gjørdar navnleysar og lagdar út á avgerðarsavn á heimasíðu okkara. Eisini tekur stovnurin sær av samsýningini hjá nevndunum og av goymsluni av málunum hjá nevndunum.

Kærustovnurin er eisini skrivstova hjá Fjølmiðlanevndini, sum viðger spurningar, um brot er framt á góðan fjølmiðlasið og um rættin at svara aftur. Hóast talan ikki er um avgerðir hjá almennum myndugleikum, er upplýsingarmannagongdin og fyrireikingin stórt sæð tann sama sum fyri hini málini.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál um skuldarumskipan til Skuldarumskipanarnevndina. Henda nevnd er ikki ein kærunevnd, men tekur støðu til umsóknir frá borgarum um eftirgeving, útsetan og umskipan av skuld. Neyðugt er við nógvum upplýsingum, áðrenn greiða kann fáast á, um treytirnar fyri eftirgeving ella útsetan eru loknar. Tilgongdin at fáa nøktandi upplýsingar til støðutakan í hesum málum kann tí til tíðir vera tung.

Onnur nevnd, sum Kærustovnurin er skrivstova hjá og sum heldur ikki er ein kærunevnd, er Høvuðsbarnaverndarnevndin. Henda nevndin tekur m.a. avgerð um umsorganaryvirtøku av børnum og um familjuviðgerð á stovnum hjá landinum. Útgangsstøðið er, at barnaverndartænasturnar hava lýst málini til fulnar, áðrenn tey verða send okkum og er okkara uppgáva tá fremst av øllum at kanna, um grundarlag er fyri at fylgja tilmælinum ella ikki, herundir at kanna, um upplýsingarnar eru nøktandi til støðutakan og at syrgja fyri at fáa til vega neyðugar upplýsingar, um hetta ikki er so.

### STARVSFÓLK

Starvsfólkatalið á stovninum eru umleið 10½ fulltíðarstørv. Starvssamansetingin fevnir um 1 stjóra, 6½ løgfrøðingar, 1 deildarleiðara og 2 skrivstovufólk.

## FÍGGJARVIÐURSKIFTI

### Fíggjarjáttanin hjá Kærustovninum 2020:

| | | |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | kr. | 7.378.000 |
| Keyp av vørum og tænastum | kr. | 683.000 |
| Keyp av útbúnaði, netto | kr. | 104.000 |
| leiga, viðlíkahald og skattur | kr. | 372.000 |
| **Nettoútreiðslujáttan** | **kr.** | **8.537.000** |

Allar nevndirnar, undantikið Kærunevndin hjá Barsilsskipanini og Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini, verða samsýntar av játtanini hjá Kærustovninum.

# 3/VIRKSEMIÐ Í 2020

## NÝGGJ MÁL

Tilsamans 367 nýggj mál eru innkomin til Kærustovnin í 2020 og er hetta næstan sama tal sum árið frammanundan, tá 372 mál vórðu móttikin. Býtið millum nevndirnar er tó ikki tað sama sum undanfarna ár. Ein munandi hækking er at síggja í tilmælum til Høvuðsbarnaverndarnevndina og í kærum til Vinnukærunevndina og Kærunevndina hjá ALS. Hinvegin er ein stór lækking í kærum til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum, Kærunevndina í lendismálum og umsóknum til Skuldarumskipanarnevndina. Kærutalið til hinar nevndirnar liggur hetta árið á nakað sama støði sum undanfarna ár.

**367**
NÝGGJ MÁL






## AVGREIDD MÁL

Avgreidd eru 369 mál í 2020 og er hetta á sama støði sum undanfarnu 3 árini. Flestu avgreiddu málini hetta árið eru at finna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, og er tað eisini á hesum økinum, at største hækkingin í avgreiddum málum er at finna. Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum hevur í 2020 tey næstflestu málini, tó at talið av málum er nógv lægri enn árið frammanundan. Kærunevndin í lendismálum og Skatta- og avgjaldskærunevndin hava somuleiðis viðgjørt færri mál enn undanfarna ár, meðan Vinnukærunevndin hevur avgreitt fleiri mál enn í 2019. Hjá hinum nevndunum er avgreiðslan á nakað sama støði sum árið frammanundan.

Vart skal gerast við, at uppgerðarhátturin fyri avgreidd mál er broyttur, tí vit meta, at fyrr brúkti hátturin gav eina skeiklaða mynd av, hvussu ymisku økini fylla í arbeiðsbyrðuni á stovninum. Í nýggja hættinum verða innkomnu tilmælini til Høvuðsbarnaverndarnevndina tald sum eitt avgreitt mál, hóast talan í einstaka málinum kann innihalda bæði avgerð um umsorganaryvirtøku og avgerðir um samveru við fleiri partar. Stabbamyndin er broytt samsvarandi. Í partinum av ársfrágreiðingini, har Høvuðsbarnaverndarnevndin verður nærri viðgjørd, ber til at síggja eina nærri útgreining av avgerðunum hjá nevndini.







## MÁL UM INNLIT

Umframt vanligu kærumálini hava nevndirnar viðgjørt umbønir um innlit. Talan kann vera um umbønir um alment innlit frá t.d. fjølmiðlum ella partsinnlit frá pørtum í einum máli.

4 mál um innlit eru viðgjørd í 2020. 2 umbønir um innlit vóru til Vinnukærunevndina, 1 til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum og 1 var til Kærunevndina í lendismálum.

**4**

**MÁL UM INNLIT**

Stytstu miðal viðgerðartíðirnar eru sum altíð at finna hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini og Høvuðsbarnaverndarnevndini, og vóru tær ávikavist 8 og 24 dagar í 2020. Málini í hesum nevndum krevja serliga skjóta viðgerð og hava serstakar viðgerðarmannagongdir sum tryggja, at so verður.

Kærunevndin hjá Studna, Kærunevndin hjá Barsilsskipanini og Fjølmiðlanevndin hava í 2020 eina miðal viðgerðartíð, sum liggur millum 2½ og knappar 3 mánaðir, sum mugu metast at vera serliga góðar viðgerðartíðir. Somuleiðis hava Kærunevndin hjá ALS og Vinnukærunevndin góðar miðal viðgerartíðir á umleið 4 mánaðir.

Miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum er knappar 5 mánaðir í 2020. Miðal viðgerðartíðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini er longd við einum mánaða í mun til undanfarna ár og er hetta árið 7½ mánaðir, sum eisini er longsta miðal viðgerðartíðin. Viðgerðartíðirnar fyri Skuldarumskipanarnevndina og Kærunevndina í lendismálum eru somuleiðis longdar í mun til árið frammanundan og eru ávikavist 6½ og 5½ mánaðir.

Viðgerðartíðirnar verða á øllum økjum roknaðar frá tí degi, málið er innkomið til Kærustovnin, til tað er avgreitt á fundi. Íroknað viðgerðartíðina er sostatt tann tíðin, tað tekur at fáa málið lýst hjá avvarðandi myndugleika, hoyrt partarnar og framleitt løgfrøðiligt uppirit um málið. Málini eru ógvuliga ymisk í vavi og torleika og hevur hetta sjálvandi týdning fyri viðgerðartíðirnar. Hóast ymiskar, verða viðgerðartíðirnar sum heild mettar at vera nøktandi og í flestu førum góðar.



# 4/KÆRUNEVNDIN Í ALMANNA-, FAMILJU- OG HEILSUMÁLUM

## NEVNDIN

Í Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum sita:

- Sigmund Poulsen, løgfrøðingur og formaður
- Kári Rasmussen, lækni
- Selma Ellingsgaard, sosialráðgevi

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá Almannaverkinum eftir m.a. forsorgarlógini, dagpeningalógini, o.ø.
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi.
- Avgerðir hjá kommunustýrum eftir lóg um barna- og ungdómstannrøkt.
- Avgerðir hjá Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd.
- Avgerðir hjá kommunalum stovnum eftir lóg um heimatænastu og eldrarøkt, og lóg um barnavernd, sum ikki kunnu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.
- Avgerðir hjá Familjufyrisitingini eftir lóg um rættarstøðu barnanna, lóg um foreldramyndugleika og samveru, verjumálslógini o.ø.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 vórðu 104 kærur latnar Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum. Hetta er nakað minni enn í 2019, tá ið 134 kærur vórðu latnar kærunevndini, men á sama støði sum í 2018, tá ið 107 kærur vórðu latnar kærunevndini.

Málsøkið hjá kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum er sera víttfevnandi og hevur tað við sær, at kærunevndin viðger nógv sera ymisk mál og kærur um avgerðir frá ymiskum myndugleikum.

Flestu móttiknu kærurnar í 2020 eru kærur um avgerðir frá Almannaverkinum, ið eru 69 í tali. Harnæst eru 20 kærur um avgerðir frá Familjufyrisitingini, og afturat teimum komu 8 kærur inn um avgerðir frá kommunalum stovnum, 4 kærur um avgerðir frá sjúkrahúsverkinum og 3 kærur um avgerðir frá Heilsutrygd.



MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 5 ÁRINI

## BÝTIÐ AV MÓTTIKNUM MÁLUM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Barnaverndarlógin | 0 | 8 | 8 |
| Dagpeningalógin | 14 | 11 | 10 |
| Dagstovnalógin | 2 | 1 | 0 |
| Forsorgarlógin | 24 | 25 | 22 |
| Almannapensjónslógin – ískoyti, afturgjald, eftirrokning v.m. | 5 | 14 | 12 |
| Almannapensjónalógin – tillutan, hækkan, broyting v.m. | 14 | 20 | 10 |
| Heilsutrygdarlógin | 24 | 13 | 3 |
| Hjúnabandslógin | 0 | 0 | 1 |
| Innlit | 2 | 7 | 3 |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | 4 | 6 | 6 |
| Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar | 3 | 1 | 4 |
| Lóg um barnatannrøkt | 0 | 0 | 0 |
| Lóg um familjuískoyti | 1 | 4 | 0 |
| Lóg um foreldramyndugleika og samveru | 1 | 6 | 10 |
| Lóg um heimatænastu | 0 | 0 | 0 |
| Lóg um rættarstøðu barnanna | 4 | 11 | 5 |
| Lóg um sjúkrahúsverkið | 3 | 5 | 4 |
| Lóg um stuðul til uppihaldspening | 0 | 0 | 3 |
| Ættleiðing | 1 | 0 | 0 |
| Verjumál | 1 | 0 | 3 |
| Annað | 4 | 2 | 0 |
| **Í alt** | **107** | **134** | **104** |

## AVGREIDD MÁL

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum hevði 15 fundir í 2020 og avgreiddi 105 mál.

Talið av avgreiddum málum í 2020 er nakað lægri enn undanfarna ár, tá ið 146 mál vórðu avgreidd. Eins og við móttiknu málunum, hava kærur um avgerðir frá Heilsutrygd eftir heilsutrygdarlógini viðvíkjandi viðurskiftum hjá útisiglarum í sambandi við heilsutrygdargjald havt ávirkan á býtið av avgreiddum málum seinastu trý árini. Í 2019 avgreiddi Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum 34 av umrøddu kærunum um avgerðir frá Heilsutrygd. Verður sæð burtur frá hesum kærunum um avgerðir frá Heilsutrygd er talið av avgreiddum málum í 2020 áleið á sama støði sum í 2019.

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum hevur í 2020 avgreitt flest kærur um avgerðir frá Almannaverkinum. Kærunevndin avgreiddi í alt 70 kærur um avgerðir frá Almannaverkinum. Eins og undanfarna ár, er talið av kærum um avgerðir eftir forsorgarlógini lækkað, og hevur kærunevndin í ár avgreitt fleiri kærur um avgerðir tiknar eftir almannapensjónslógini enn kærur um avgerðir tiknar eftir forsorgarlógini. Talið av avgreiddum kærum um avgerðir tiknar eftir almannapensjónslógini er tó á sama støði sum undanfarna ár.

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum hevur avgreitt 17 kærur um avgerðir frá Familjufyrisitingini, 11 kærur um avgerðir frá kommunalum stovnum, 4 kærur um avgerðir frá sjúkrahúsverkinum og 3 kærur um avgerðir frá Heilsutrygd.

## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Barnaverndarlógin | 1 | 7 | 8 |
| Dagpeningalógin | 16 | 13 | 11 |
| Dagstovnalógin | 0 | 1 | 0 |
| Forsorgarlógin | 38 | 28 | 17 |
| Almannapensjónslógin – ískoyti, afturgjald, v.m. | 4 | 10 | 12 |
| Almannapensjónslógin – tillutan, hækkan, v.m. | 12 | 14 | 15 |
| Heilsutrygdarlógin | 6 | 34 | 3 |
| Hjúnabandslógin | 0 | 0 | 1 |
| Innlit | 3 | 2 | 3 |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | 5 | 4 | 4 |
| Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar | 3 | 1 | 3 |
| Lóg um barnatannrøkt | 0 | 0 | 0 |
| Lóg um familjuískoyti | 0 | 3 | 2 |
| Lóg um foreldramyndugleika og samveru | 0 | 4 | 7 |
| Lóg um heimatænastu | 3 | 2 | 0 |
| Lóg um rættarstøðu barnanna | 1 | 11 | 6 |
| Lóg um stuðul til uppihaldspening | 0 | 1 | 2 |
| Lóg um sjúkrahúsverkið | 2 | 6 | 4 |
| Ættleiðing | 1 | 0 | 0 |
| Verjumál | 0 | 1 | 2 |
| Annað | 0 | 5 | 5 |
| **Í alt** | **98** | **146** | **105** |

## AVGREIÐSLAN




Av teimum 105 avgreiddu málunum í 2020 var býtið millum myndugleikarnar soleiðis, at Almannaverkið átti 70 mál, Sjúkrahúsverkið 4 mál, kommunurnar 11 mál, Heilsutrygd 3 mál og Familjufyrisitingin 17 mál.

# ALMANNAVERKIÐ

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ ALMANNAVERKINUM

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum hevur í 2020 avgreitt 70 kærur um avgerðir frá Almannaverkinum. Málsøkið hjá Almannaverkinum er víttfevnandi og tekur Almannaverkið nógvar ymiskar avgerðir, ið kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

Í 2020 hevur kærunevndin avgreitt kærur innan hesi málsøkir:

### Almannapensjónslógin

Í 2020 avgreiddi kærunevndin 27 kærur um avgerðir hjá Almannaverkium eftir almannapensjónslógini, harav 19 teirra vórðu staðfestar. Ein kæra varð heimvíst til nýggja viðgerð av teirri orsøk, at avgerðin var tikin á gomlum lógargrundarlagi og tí kærunevndin metti, at Almannaverkið skuldi gera eina nýggja meting av umstøðunum í málinum. Fýra kærur fullu burtur, harav tríggjar, tí Almannaverkið hevði endurskoðað málini og tikið nýggja avgerð. Ein kæra fall burtur, tí kærarin sjálvur afturkallaði kæruna.

Kærunevndin broytti tríggjar avgerðir frá Almannaverkinum eftir almannapensjónslógini. Ein kæra viðvíkjandi brotpensjón varð broytt, tí kærunevndin var ósamd við Almannaverkinum í grundarlagnum undir avgerðini og játtaði kæraranum eina hægri brotpensjón, enn Almannaverkið hevði játtað kæraranum.

Tvær avgerðir viðíkjandi eftirrokning av pensjónum vórðu broyttar, tí eftirkannaða útrokningin gav eitt hægri krav enn eftir kærdu avgerðini og tí vórðu avgerðirnar broyttar soleiðis, at afturgjaldskrøvini vórðu ásett at vera hægri enn Almannaverkið hevði ásett.

### Forsorgarlógin

Kærunevndin avgreiddi 17 kærur um avgerðir hjá Almannaverkinum eftir forsorgarlógini, harav ein kæra varð avvíst, tí hon ikki var fevnd av málsræðnum hjá Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum. Kærunevndin staðfesti 10 avgerðir, ið vórðu tiknar eftir forsorgarlógini. Seks kærur follu burtur, tí Almannaverkið tók málini upp til nýggja viðgerð.

### Dagpeningalógin

Kærunevndin avgreiddi 11 kærur um avgerðir tiknar eftur dagpeningalógini og staðfesti kærunevndin sjey teirra. Tvær avgerðir vórðu broyttar, harav onnur teirra varð broytt, tí kærunevndin metti, at grundarlag var fyri at víkja frá umsóknarfreistini í dagpeningalógini. Hin avgerðin varð broytt, tí kærunevndin metti, at kærarin hevði rætt til dagpening vegna sjúkt barn fyri eitt ávíst tíðarskeið, tí grundarlag var fyri at staðfesta, at talan var um álvarsligan vanda fyri lívinum ella heilsustøðuni hjá barninum.

Ein kæra fall burtur, tí Almannaverkið tók málið upp til nýggja viðgerð. Ein kæra varð avvíst, tí hon ikki var fevnd av málsræðnum hjá Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum.

### Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Fýra kærur um avgerð hjá Almannaverkinum eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk vórðu avgreiddar. Tvær vórðu staðfestar og ein fall burtur, tí Almannaverkið hevði tikið nýggja avgerð í málinum. Ein kæra varð heimvíst til nýggja viðgerð, tí kærunevndin metti ikki, at Almannaverkið hevði gjørt eina ítøkiliga meting av og kannað, hvørt treytirnar fyri at fáa játtað lønarískoyti upp til fulla tíð, vóru loknar.

### Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, lóg um familjuískoyti og lóg um stuðul til uppihaldspening

Kærunevndin avgreiddi tríggjar kærur um avgerðir hjá Almannaverkinum eftir lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, harav ein varð staðfest. Ein kæra varð afturkallað og fall burtur. Ein kæra varð heimvíst til nýggja viðgerð, tí kærunevndin metti ikki, at Almannaverkið hevði grundgivið fyri, hví Almannaverkið metti, at kærarin hevði móttikið stuðul sambært lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar móti betri vitandi og uttan at hava rætt til veitingina.

Tvær kærur um avgerðir frá Almannaverkinum eftir lóg um familjuískoyti vórðu avgreiddar og vórðu báðar staðfestar. Eisini vórðu tvær avgerðir frá Almannaverkinum eftir lóg um stuðul til uppihaldspening avgreiddar og varð ein teirra staðfest. Hin kæran fall burtur, tí Almannaverkið ikki hevði tikið endaliga avgerð í málinum.

### Annað

Kærunevndin viðgjørdi eina kæru um avgerð hjá Almannaverkinum um innlit í skjøl frá Almannaverkinum í málum, sum myndugleikin umsitur. Kærunevndin staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum.

Tríggjar kærur um avgerðir frá Almannaverkinum vórðu latnar inn eftir at kærufreistin var farin, og vórðu allar kærurnar avvístar, tí mett varð ikki, at talan var um serstakt føri, sum kundi loyva frávik frá kærufreistini.

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ ALMANNAVERKINIM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 43 | 51 | 43 |
| Broytt | 9 | 2 | 5 |
| Heimvíst | 9 | 33 | 3 |
| Burturfallin | 11 | 15 | 14 |
| Avvíst | 2 | 3 | 2 |
| Kærufreist | 4 | - | 3 |
| Uppafturtøka | 3 | - | - |
| **Í alt** | **81** | **74** | **70** |




GEVIÐ GÆTUR! Í uppgerðini í mun til % er sæð burtur frá málum sum eru avvíst, málum um kærufreist og uppafturtøku.

# KOMMUNURNAR

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ KOMMUNUNUM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 3 | 1 | 5 |
| Broytt | - | - | - |
| Heimvíst | - | 3 | 1 |
| Burturfallin | 1 | 2 | 0 |
| Avvíst | 1 | 4 | 3 |
| Annað | 1 | 1 | - |
| Kærufreist | - | - | 2 |
| **Í alt** | **6** | **11** | **11** |

Kærunevndin hevur í 2020 avgreitt 11 kærur um avgerðir frá kommunalum stovnum.

Kommunalir stovnar fevna millum annað um Barnaverndarstovuna, barnaverndartænastur og heimatænastur kring landið. Hesir stovnar taka avgerðir eftir millum annað barnaverndarlógini, dagstovnalógini og lóg um heimatænastu v.m., sum kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

Í 2020 avgreiddi kærunevndin tvær kærur um avgerðir frá Barnaverndarstovuni, harav ein teirra varð staðfest. Hin kæran varð latin inn ov seint og sýtti kærunevndin kæraranum frávik frá kærufreistini, tí kærunevndin metti ikki, at talan var um serstakt føri, ið loyvdi kæraranum frávik frá kærufreistini.

Kærunevndin avgreiddi í alt níggju kærur um avgerðir frá barnaverndartænastum í Føroyum. Kærunevndin staðfesti fýra avgerðir og heimvísti eina avgerð til nýggja viðgerð, tí mett varð, at avgerðin hjá myndugleikanum varð tikin á ófullfíggjaðum grundarlagi.

Kærunevndin avvísti tríggjar kærur um avgerðir frá barnaverndartænastum í Føroyum av teirri orsøk, at avgerðirnar ikki vóru fevndar av málsræðinum hjá kærunevndini, sum tí ikki hevði heimild at viðgera kærurnar. Talan vóru um avgerðir, har barnaverndartænastan hevði givið foreldrum boð um, at ásettar samverur við børn teirra vórðu avlýstar ella broyttar í eitt ávíst tíðarskeið vegna støðuna í samfelagnum við Covid-19. Kærunevndin metti, at talan var um útinnandi fyrisiting (faktiska fyrisiting), ið ikki er fevnt av málsræðinum hjá Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum.

Ein kæra um avgerð frá eini barnaverndartænastu varð latin inn ov seint og sýtti kærunevndin kæraranum frávik frá kærufreistini, tí kærunevndin metti ikki, at talan var um serstakt føri, ið loyvdi kæraranum frávik frá kærufreistini.

# SJÚKRAHÚSVERKIÐ

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ SJÚKRAHÚSVERKINUM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 1 | 5 | 3 |
| Broytt | - | - | - |
| Heimvíst | - | - | - |
| Burturfallin | 1 | - | 1 |
| Avvíst | 2 | 1 | - |
| **Í alt** | **4** | **6** | **4** |

Í 2020 avgreiddi kærunevndin í almanna-, famlju- og heilsumálum 4 kærur um avgerðir frá sjúkrahúsverkinum, harav tríggjar teirra vórðu staðfestar. Av teimum avgerðunum, ið vórðu staðfestar, vóru tvær kærur um sýtan av fylgjara í sambandi við sjúkuviðgerð uttanlanda og ein kæra um sýtan av endurgjaldi fyri ferða- og uppihaldsútreiðslur.

Ein kæra um úflýggjan av rokning frá sjúkrahúsverkinum í sambandi við viðgerð frá sjúkrahúsinum fall burtur, tí lógargrundarlagið varð broytt og harvið varð grundarlagið fyri avgerðini broytt til fyrimun fyri kæraran.

# HEILSUTRYGD

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ HEILSUTRYGD

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | - | - | - |
| Broytt | - | 13 | - |
| Heimvíst | 3 | 21 | 3 |
| Burturfallin | - | - | - |
| Avvíst | 2 | - | - |
| Uppafturtøka | - | - | - |
| Annað | - | 2 | - |
| **Í alt** | **5** | **36** | **3** |

Í 2020 avgreiddi kærunevndin 3 kærur um avgerðir frá Heilsutrygd um sýtan av frítøku fyri og afturrindan av heilsutrygdargjaldi. Hetta er væl minni enn árið frammanundan, tá ið 36 kærur um avgerðir frá Heilsutrygd vórðu avgreiddar.

Í 2019 og 2018 vórðu ávikavist 13 og 24 kærur um avgerðir frá Heilsutrgyd eftir heilsutrygdarlógini viðvíkjandi viðurskiftum hjá útisiglarum í sambandi við heilsutrygdargjald latnar kærunevndini, og hevur talið av móttiknum og avgreiddum kærum frá Heilsutrygd viðvíkjandi frítøku fyri heilsutrygdargjaldi havt ávirkan á býtið av móttiknum og avgreiddum kærum hjá Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum seinastu trý árini.

Málini, sum eru avgreidd í 2020, snúgva seg eins og tey, ið vórðu avgreidd í 2019, í høvuðsheitum um, hvørt kærararnir kunnu frítakast fyri heilsutrygdargjaldi vísandi til Norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd og vísandi til, at kærararnir hava goldið til aðra heilsutrygdarskipan í einum norðurlandi, sum kærarin arbeiðir í, men ikki býr í.

Kærunevndin heimvísti allar tríggjar avgerðirnar til nýggja viðgerð. Tvær avgerðir vórðu heimvístar av teirri orsøk, at kærunevndin ikki metti, at málini kundu avgreiðast soleiðis sum málini vóru upplýst. Ein avgerð varð heimvíst til Heilsutrygd til støðutakan um frítøku fyri rindan av heilsutrygdargjaldi.

# FAMILJUFYRISITINGIN

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ FAMILJUFYRISITINGINI

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 2 | 11 | 14 |
| Heimvíst | - | 3 | 1 |
| Burturfallin | - | 2 | 1 |
| Uppafturtøku | - | 1 | 1 |
| Annað | - | 2 | - |
| **Í alt** | **2** | **19** | **17** |

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum avgreiddi í 2020 í alt 17 kærur um avgerðir frá Familjufyrisitingini.

Familjufyrisitingin tekur avgerðir eftir um millum annað lóg um foreldramyndugleika og samveru, lóg um rættarstøðu barnanna, hjúnabandslógini og verjumálslógini.

Av teimum 17 kærunum, ið vórðu avgreiddar í 2020, vórðu átta kærur um avgerðir viðvíkjandi samveru, ið verður ásett eftir lóg um foreldramyndugleika og samveru. Sjey av hesum avgerðum vórðu staðfestar og fall ein kæra burtur, tí Familjufyristingin ikki hevði tikið endaliga avgerð í málinum og var málið sostatt framvegis undir viðgerð hjá Familjufyrisitingini.

Kærunevndin avgreiddi fimm kærur um avgerðir viðvíkjandi barnagjaldi, ið verður álagt eftir lóg um rættarstøðu barnanna. Kærunevndin staðfesti tríggjar av hesum og heimvísti eina avgerð til nýggja viðgerð, tí kærunevndin metti ikki, at Familjufyrisitingin hevði gjørt eina ítøkiliga meting av, hvørt treytirnar sambært lóg um rættarstøðu barnanna vóru loknar, áðrenn barnagjald varð álagt foreldrinum.

Ein kæra um avgerð hjá Familjufyrisitingini eftir hjúnabandslógini varð avgreidd og varð hendan staðfest.

Kærunevndin hevur avgreitt eina kæru um avgerð frá Familjufyrisitingini eftir verjumálslógini, ið varð staðfest. Biðið varð um uppafturtøku av málinum, men hesum sýtti kærunevndin av teirri orsøk, at einki nýtt var komið fram í málinum.

Kærunevndin hevur harumframt avgreitt eina kæru um avgerð hjá Familjufyrisitingini um at veita einum foreldri innlit í fíggjarligu skjølini hjá hinum foreldrinum í sambandi við, at søkt varð um hækkan av barnagjaldi til felags barn teirra eftir lóg um rættarstøðu barnanna. Málið varð viðgjørt eftir fyrisitingarlógini og varð avgerðin hjá Familjufyrisitingini staðfest.

# VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2020 var beint undir 5 mánaðir, ið er á sama støði sum í 2019, men nakað hægri enn í 2018 og 2017, har miðal viðgerðartíðin var knappar 4 mánaðir.

Strembað verður altíð eftir, at viðgerðartíðin er so stutt sum gjørligt og hóast miðal viðgerðartíðin er nakað hægri í 2020 enn undanfarin ár og ásannast kann, at viðgerðartíðin kann verða styttri, so verður viðgerðartíðin í 2020 ikki mett at vera alt ov long, tá hugsað verður um, at viðgerðartíðin verður roknað frá tí at ein kæra er móttikin á skrivstovuni hjá kærunevndini, til hon er avgreidd á fundi í kærunevndini. Tað vil siga, at tíðin sum fer til at fáa ummæli frá myndugleikunum, partshoyring og innheintan av upplýsingum, eisini er er partur av viðgerðartíðini. Havast skal eisini í huga, at summi mál kunnu hava sera drúgva viðgerð, ið møguliga kann hava eina ávirkan á samlaðu miðal viðgerðartíðina.

# SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

## Innlit í fíggjarligar upplýsingar hjá fyrrverandi hjúnafelaga

### Mál nr.: 20/00034

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum viðgjørdi eitt mál, har Familjufyrisitingin sum liður í viðgerðini av eini umsókn um hækkað barnagjald, hevði tikið avgerð um at senda fíggjarligu upplýsingarnar hjá pørtunum í málinum, til hoyringar hjá báðum pørtum. Partarnir í málinum vóru kærarin og fyrrverandi hjúnafelagi kærarans.

Kærunevndin vísti á, at sambært § 14 í lóg um rættarstøðu barnanna (lov nr. 200 af 18. mai 1960 om børns retsstilling, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017) verður barnagjald m.a. ásett við støði í fíggjarviðurskiftunum hjá foreldrunum og sambært vegleiðing á økinum, verður dentur lagdur á atlit til barnsins besta og inntøkuna hjá gjaldskylduga, sum hon kann væntast at verða framyvir.

Kærunevndin staðfesti, at fíggjarligir upplýsingarnar hjá gjaldskylduga eru avgerandi upplýsingar í viðgerðini av eini umsókn um økt barnagjald.

Kærunevndin vísti á, at avgerðin hjá Familjufyrisitingini um at senda fíggjarligar upplýsingar til hoyringar hjá pørtunum í slíkum málum er ein fyrisitingarlig avgerð, har ein partur í málinum sambært § 19, stk. 1, í fyrisitingarlógini, skal hoyrast um veruligu viðurskiftini í málinum, um upplýsingar eru til ógagns fyri viðkomandi og av serligum týdningi fyri avgerðina í málinum.

Tó so, skal ein partur ikki verða hoyrdur, um talan er um upplýsingar, sum parturin ikki hevur rætt til at fáa innlit í sambært kapittul 4 í fyrisitingarlógini, ið fevnir um §§ 9-15.

Sambært § 10, stk. 1, í fyrisitingarlógini fevnir rætturin til skjalainnlit um øll skjøl í málinum, undantikið skjøl fevnd av §§ 12-15 í fyrisitingarlógini. Ásett er í § 15, stk. 1, at rætturin til skjalainnlit kann avmarkast, um áhugin hjá partinum í at kunna nýta kunnleikan til skjøl og harvið upplýsingar í málinum, til at røkja egin áhugamál, verður mettur at eiga at víkja fyri avgerandi fyriliti til viðkomandi sjálvum ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum.

Hvat viðvíkur viðgerð av umsóknum um ásetan av barnagjaldi, eru fíggjarligu upplýsingarnar hjá partunum ein týðandi og avgerandi partur av viðgerðini og grundarlagnum undir eini avgerð um ásetan av barnagjaldi.

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Familjufyrisitingini, tí mett varð ikki, at rætturin til partshoyring og harvið møguleikin hjá partinum í málinum at røkja síni áhugamál, átti at víkja fyri atlitinum til áhugan hjá kæraranum at halda aftur hansara fíggjarligu upplýsingar.

Kærunevndin vísti tó á, at sum útgangsstøði er talan einans um upplýsingar um skattskylduga inntøku hjá partunum í málinum og eru upplýsingar útyvir skattskylduga inntøkuna sum útgangsstøði ikki viðkomandi. Partarnir í málinum avgera harumframt sjálvir, á hvønn hátt viðkomandi upplýsir og harvið skjalprógvar sína inntøku.

# Útgjald eftir lóg um almennar pensjónir steðgað

## Mál nr. 19/00172

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum viðgjørdi eitt mál, har Almannaverkið hevði tikið avgerð sambært § 28, stk. 3, í lóg um almannapensjónir, um at steðga útgjald av pensjón, tí viðkomandi skuldi sita dóm av.

Ásett er í nevndu grein:

*"Tá ein pensionistur situr revsing ella er undir øðrum frælsisskerjandi fyriskipanum sambært dómi, verður pensiónin útgoldin honum í 6 mánaðir frá endan av tí mánaði, viðkomandi byrjar at sita dómin av. Pensiónin dettur burtur írestandi revsitíðina. Hjálpar- og røktarviðbót detta burtur við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin viðkomandi byrjar at sita dómin av."*

Kærunevndin vísti á, at í hesum ítøkiliga føri var talan um eitt mál, har kærarin hevði fingið "anbringelsesdóm", har tað ikki var ásett nøkur longsta tíð og talan var um dóm um psykiatriska viðgerð, har ein yvirlækni ikki hevur heimild at útskriva sjúklingin, so sum vanligt er við psykiatriskum sjúklingum.

Kærunevndin staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum, tí mett varð, at talan var um "aðrar frælsisskerjandi fyriskipanir sambært dómi", sum ásett er í § 28, stk. 3, í lóg um almannapensjónir.

# Sýtt umsókn um fíggjarligan stuðul til løgfrøðiliga ráðgeving

## Mál nr. 20/0007

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum viðgjørdi eitt mál, har ein barnaverndartænasta hevði tikið avgerð um at sýta umsókn kærarans um fíggjarligan stuðul til løgfrøðiliga ráðgeving.

Barnaverndartænastan vísti í avgerð síni millum annað á, at barnavendarlógin inniheldur ikki, eins og t.d. danska servicelógin, ásetanir og heimildir at gjalda fyri umboðan av advokati í barnaverndarmálum.

Barnavendartænastan greiddi í avgerð síni frá, at sambært § 15 í barnaverndarlógini, kann barnaverndartænastan seta ymiskar fyribyrgjandi fyriskipanir í verk við tí endamáli at fyribyrgja, at barnið verður sett heiman. Hetta kann t.d. vera sálarfrøði viðtalur, familjuráðgeving og stuðul í heimið. Sambært § 15, stk. 3, kann barnaverndarnevndin veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið fylgja av fyriskipanum eftir stk. 1-8, tá ið foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar.

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum vísti millum annað á, at barnaverndartænastan sambært orðingini í § 15, stk. 1, nr. 1, í barnaverndarlógini hevur breiða heimild at játta fyriskipanir, sum verða mettar at gagna í ítøkiliga málinum. Tað er tó greitt, at talan í § 15 er um fyribyrgjandi fyriskipanir. Hetta framgongur av yvirskriftini til greinina. Endamálið við teimum fyribyrgjandi fyriskipanunum er, sambært serligu viðmerkingunum til greinina, at gera tað møguligt hjá barninum at verða verandi í heiminum so leingi, sum tað ber til (løgtingsmál nr. 10/2004).

Hvat viðvikur § 16 í barnaverndarlógini vísti kærunevndin millum annað á, at endamálið við § 16 í barnaverndarlógini sambært serligu viðmerkingunum til greinina er, at hava eftirlit við, at fyriskipanir virka sum ætlað og at møguleiki er at seta í verk fyriskipanir fyri foreldur og børn. Sambært serligu viðmerkingunum til nevndu grein kann tað verða neyðugt at seta fyriskipanir í verk fyri foreldur, ímeðan barnið er sett heiman, tá ið ætlanin er, at barnið skal heim aftur til foreldrini. Kærunevndin vísti á, at tað at stuðla foreldrum við løgfrøðiliga ráðgeving ikki er at fyrireika heimið at taka ímóti barninum aftur og tí metti kærunevndin ikki, at § 16 í barnaverndarlógini var viðkomadi í samband við umsókn kærarans um stuðul til løgfrøðiliga ráðgeving.

Harumframt vísti kærunevndin á, at avgerðir um ókeypis umboðan sambært § 57 í barnaverndarlógini verða tiknar av Høvuðsbarnaverndarnevndini og at nevnda grein fellur undir málsviðgerðarreglurnar fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Sostatt fellur § 57 í barnaverndarlógini uttan fyri heimildarøkið hjá barnaverndartænastuni.

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá barnaverndartænastuni um ikki at veita kæraranum stuðul til løgfrøðiliga ráðgeving. Avgerðin var grundað á, at heimild er ikki at veita fíggjarligan stuðul til løgfrøðiliga ráðgeving eftir § 15 ella § 16 í barnaverndarlógini.

# 5/SKATTA- OG AVGJALDSKÆRUNEVNDIN

## NEVNDIN

Í Skatta- og avgjaldskærunevndini sita:

- Alfred Petersen, advokatur og formaður
- Rannvá Sólheim, løgfrøðingur og næstformaður
- Bogi P. Nielsen, roknskaparkønur
- Heri á Rógvi, búskaparfrøðingur
- Susanne Nielsen, fíggjarleiðari

## VIÐGERÐARØKIÐ

Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald. Harumframt eisini avgerðir hjá TAKS sambært eftirlønarlógini, lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn o.l.
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjald við skrásetingargjald á motorakførum.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 eru 42 kærur latnar Skatta- og avgjaldskærunevndini. Av hesum eru 17 um skylduna at rinda til egna eftirløn, 8 um meirvirðisgjald, 6 um toll, 1 um avgjald á akfari, 1 um lønarhæddaravgjald og 1 um uppafturtøku. Harumframt eru 8 kærur, ið snúgva seg um annað á skattaøkinum – m.a. kapitalvinningi, ferðastuðli o.ø.

Talið av kærum móttiknum í 2020 er áleið tað sama sum í 2019 – 3 kærur færri eru móttiknar í 2020. Í 2019 vóru óvanliga nógvar kærur um FAS afturbering móttiknar, meðan eingin kæra um FAS afturbering er móttikin í 2020. Harafturímóti eru tað aftur í 2020 móttiknar nógvar kærur um eftirlønargjald – 17 í tali. Onkur undanfarin ár hava kærurnar um eftirlønargjald fylt sera nógv í virkseminum hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini, har serliga ár 2015 var sermerkt, tá omanfyri 100 kærur um eftirlønargjald vórðu móttiknar.



MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## AVGREIDD MÁL

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði 7 vanligar fundir í 2020. Tilsamans vórðu 29 mál avgreidd í 2020, ið er nakað færri enn tey 35 avgreiddu málini í 2019.




AVGREIDD MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Skattur | 17 | 10 | 9 |
| Stuðulslógirnar | 1 | 0 | 0 |
| Sekt eftir § 104 í skattalógini | 0 | 1 | 0 |
| Meirvirðisgjald | 10 | 5 | 5 |
| Skrásetingargjald á motorakførum | 0 | 1 | 0 |
| Tollur og onnur avgjøld | 1 | 3 | 3 |
| Kærufreist, málsræði v.m. | 1 | 1 | 4 |
| Mótrokning | 1 | 0 | 0 |
| Dupult húsarhald | 0 | 1 | 0 |
| Annað (m.a. eftirløn, AMEG o.a.) | 7 | 7 | 7 |
| Armslongd - §37a | 0 | 6 | 1 |
| **Í alt** | **38** | **35** | **29** |

Býtið millum ymisku evnini skiftir vanliga nakað hvørt árið og í so máta er 2020 einki undantak.

Í 2020 hevur býtið av avgreiddum kærum verið rættiliga javnt býtt og fevnir um størsta partin av málsøkinum hjá nevndini. Í mun til 2019, so kann nevnast, at í 2020 er bert eitt mál avgreitt um armslongdarmeginregluna í § 37a, ið annars var eitt økið, sum fylti rættiliga nógv í 2019.

## AVGREIÐSLAN

Um hugt verður eftir samlaðu avgreiðsluni hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini, so sæst, at 15 av teimum 29 kærumálunum eru staðfest av nevndini. Tað er sostatt helmingurin av málunum, ið eru staðfest, og er hetta í tráð við undanfarin ár.




# TAKS

## AVGREIÐSLAN AV MÁLUM HJÁ TAKS

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 18 | 16 | 15 |
| Broytt | 2 | 0 | 2 |
| Partvís broytt | 0 | 0 | 0 |
| Heimvíst | 6 | 3 | 1 |
| Burturfallin | 3 | 3 | 3 |
| Avvíst | 3 | 2 | 3 |
| Afturkallað | 1 | 2 | 0 |
| Kærufreist | 1 | 0 | 1 |
| Annað | 0 | 1 | 0 |
| **Í alt** | **34** | **27** | **25** |

Av teimum 29 kærunum, sum eru avgreiddar í 2020, eru 25 kærur um avgerðir hjá TAKS. Nógv tann stórsti parturin av avgerðunum hjá TAKS, 15 í tali, eru staðfestar. 6 kærur um avgerðir hjá TAKS eru annaðhvørt avvístar ella burturfalnar, meðan einans 3 eru broyttar ella heimvístar.

# KOMMUNALU SKATTAKÆRU-NEVNDIRNAR OG AKSTOVAN

Tað vóru 3 kærur um avgerðir hjá kommunalu skattakærunevndunum, ið vóru avgreiddar av Skatta- og avgjaldskærunevndini í 2020. Allar 3 avgerðirnar hjá kommunalu skattakærunevndunum, ið Skatta- og avgjaldskærunevndin avgreiddi í 2020, vóru annaðhvørt broyttar ella partvís broyttar.

Skatta- og avgjaldskærunevndin avgreiddi eina kæru um avgerð hjá Akstovuni í 2020. Málið bleiv viðgjørt í mun til kærufreist, har frávik frá kærufreistini bleiv loyvt. Sjálv avgerðin hjá Akstovuni er ikki endaliga avgreidd enn.

# VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2020 var áleið 7 ½ mánaðar og er hetta áleið ein mánað longri enn í 2019. Viðgerðartíðin fevnir um alla málsgongdina, eisini tilgongdina, tá ið myndugleikar og partar í málinum upplýsa málið. Hetta kann vera ein long tilgongd og tí kunnu tað vera nógvar ymiskar orsøkir til, at viðgerðin av einstøkum málum gerst longri.

Viðgerðartíðin verður mett at vera á einum heilt góðum støði fyri hetta slagið av málum, ið ofta eru sera trupul og umfatandi.

Ein trupulleiki, sum hevur verið serliga sjónligur seinastu tíðina er, at summi mál kunnu vera tvíbýtt. Skilt soleiðis, at partur av máli skal kærast til kommunala skattakærunevnd, meðan annar partur av sama máli skal kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina, hóast málini hanga saman, og úrslitini av viðgerðunum báðum, beinleiðis ella óbeinleiðis, ávirka samlaða málið.

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur sum meginreglu ikki at viðgera mál, ið samstundis eisini eru kærd til kommunala skattakærunevnd. Tílíkar støður eru óhepnar fyri allar partar og gera alla kærumálstilgongdina bæði fløktari og longri. Hetta leingir sjálvsagt eisini um viðgerðartíðina hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini, tá mál stundum liggja still og bíða eftir at sleppa í hoyring hjá pørtunum, meðan partur av málinum er til viðgerð í kommunalari skattakærunevnd.

Nevnast kann, at um tey málini í 2020, sum hava tilknýti til kommunalu skattakærunevndirnar – 5 í tali, ikki vera tald við í miðal viðgerðartíðina, so styttist viðgerðartíðin við meira enn 2 ½ mánað til undir 5 mánaðar.

# SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

Niðanfyri verður stutt greitt frá nøkrum av serliga spennandi málunum, ið nevndin hevur havt til viðgerðar í 2020.

## Málsræði - krav um lønarhæddaravgjald aftur í tíð fyri farin inntøkuár

### Mál nr. 20/00084

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði mál til viðgerðar viðvíkjandi kærara, sum hevði kært, at TAKS hevði kravt kæraran eftir lønarhæddaravgjaldi aftur í tíð fyri farin inntøkuár.

Málið snúði seg ikki um, hvørt kærarin var avgjaldsskyldugur ella um støddina á sjálvum avgjaldinum. Talan var heldur ikki um eina meting eftir § 11, stk. 2 í lønarhæddaravgjaldslógini. Málið snúði seg einans um, hvørt TAKS kundi seta fram krav um, at kærarin skuldi rinda lønarhæddaravgjald aftur í tíð, fyri farin inntøkuár.

Skatta- og avgjaldskærunevndin vísti m.a. á, at økið viðvíkjandi kærum um lønarhæddaravgjald er eitt økið, sum hevur verið fyri broytingum seinastu nógvu árini. Yvirskipað vísti nevndin á, at soleiðis sum økið er skipað í dag, so er heimildin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini avmarkað til heilt ávísar spurningar um lønarhæddaravgjald.

Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørdi at avvísa málið, tá mett varð, at kæran um spurningin um, hvørt TAKS kundi krevja lønarhæddaravgjald aftur í tíð lá uttan fyri heimildarøkið hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini.

## Ómaksgjald í sambandi við MVG-uppgerð fráboðað umvegis teldupost
### Mál nr. 19/00273

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði mál til viðgerðar viðvíkjandi kærara, sum m.a. kærdi avgerð hjá TAKS at áleggja kæraranum ómaksgjald fyri hvørja MVG uppgerð, sum varð fráboðað umvegis teldupost.

Skatta- og avgjaldskærunevndin vísti á, at sambært rundskrivi, nr. 1 frá 22. desember 2014, er ásett í pkt. 1, at frá 1. januar 2015 skulu vinnukundar hjá TAKS sum ikki nýta hentleikarnar í Vinnugrugganum, rinda ómaksgjald. Hetta merkir sambært kunngerðini, at vinnukundar, ið ikki sjálvir umvegis Vinnugluggan avgreiða eitt nú MVG-uppgerðir, framyvir skulu rinda TAKS kostnaðin fyri at skráseta manuelt fyri kundan. Kærarin vísti m.a. á, at hann metti, at ein teldupostur við mvg-uppgerð, eigur at javnsetast við nýtslu av vinnuglugganum, av tí at ein teldupostur eisini er talgildur. Skatta- og avgjaldskærunevndin viðmerkti, at í § 35 verður víst til, at upplýsingar skulu fráboðast umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS ella við gs-lykli. Í rundskrivinum verður víst á, at "vinnukundar, ið ikki sjálvir umvegis Vinnugluggan avgreiða eitt nú MVGuppgerðir…". Við støði í hesum verða aðrir mátar at fráboða upplýsingar uppá, mettir at fella uttanfyri § 35, stk. 1 og í staðin fevndir av stk. 2.

Skatta- og avgjaldskærunevndin vísti á, at tað var greitt, at vinnukundar sum meginregla skulu nýta sjálvgreiðsluna hjá TAKS, tá hesir skulu lata TAKS upplýsingar. Verða hesir upplýsingar latnir á annan hátt, verður álagt viðkomandi at rinda ómaksgjald. Hvørki lóg, viðmerkingar til lógina ella rundskrivið heimilað undantøkum í slíkum førum. Heldur ikki er nakað grundarlag í áðurnevndu til at gera eina rúmari tulking av § 35, stk. 1, soleiðis at teldupostar eisini vera fevndir av lógargreinini.

Skatta- og avgjaldskærunevndin metti sostatt, at tá MVG-uppgerð verður fráboðað umvegis teldupost, er fráboðað á "annan hátt" sum nevnt í § 35, stk. 2.

Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá TAKS at áleggja kæraranum ómaksgjald í sambandi við MVG-uppgerð, sum varð fráboðað umvegis teldupost.

*Navnloyndar útgávur av hesum avgerðunum, og nógvar aðrar avgerðir, kunnu lesast í fullum líki í avgerðarsavninum á heimasíðuni hjá Føroya Kærustovni á www.fks.fo.*

# 6/KÆRUNEVNDIN HJÁ STUDNA

## NEVNDIN

Í Kærunevndini hjá Studna sita:
- Anna Borg Dahl, løgfrøðingur og forkvinna
- Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur
- Maria Gregersen, lestrarvegleiðari

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærunevndin hjá Studna viðger kærur um avgerðir hjá Studna eftir løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul.

## MÓTTIKIN MÁL

Kærutalið til hesa nevnd er vanliga ikki serliga høgt, og hetta árið er ikki nakað undantak í so máta. Í 2020 komu 8 nýggjar kærur til Kærunevndina hjá Studna. Av hesum snúðu 6 seg um lestrarstuðul í Føroyum og 2 um lestrarstuðul uttan fyri Føroyar.




MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## AVGREIDD MÁL

Kærunevndin hevði 4 fundir í 2020. Avgreidd vórðu 9 mál, harav eitt var innkomið árið frammanundan. Í 2018 og 2019 vórðu 6 mál avgreidd um árið.




AVGREIDD MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## AVGREIÐSLAN

Av teimum 9 málunum, sum vórðu avgreidd hetta árið, vórðu 6 mál staðfest og 2 mál avvíst. Eina málið varð avvíst, tí tað fall uttanfyri virkisøkið hjá Kærunevndini hjá Studna, og hitt málið varð avvíst, tí kært var ov seint. Harumframt fall eitt mál burtur, tí Studni tók nýggja avgerð í málinum.




## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Ferðastuðul til lesandi uttanlands | 0 | 0 | 2 |
| Lestrarstuðul í Føroyum | 5 | 3 | 6 |
| Lestrarstuðul uttanfyri Føroyar | 1 | 3 | 1 |
| Lestrarstuðul uttanfyri Norðurlond | 0 | 0 | 0 |
| **Í alt** | **6** | **6** | **9** |

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Í 2020 var miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini hjá Studna 2½ mánaðir. Viðgerðartíðin er sostatt farin niður sammett við undanfarnu ár, tá hon var ávikavist 4 og 3 mánaðar.

Ein miðal viðgerðartíð á 2½ mánaðar er stutt tíð, tá hugsað verður um, at viðgerðartíðin verður roknað, frá kæran er innkomin á Kærustovnin, til hon er avgreidd á fundi. Tað vil siga, at tíðin, sum fer til ummælis, hoyring og innheintan av upplýsingum annars eisini er partur av viðgerðartíðini.

# SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

## Inntøkujavning av lestrarstuðli
### Mál nr. 20/00057

Í málinum varð kært um inntøkujavning av lestrarstudningi. Kærarin byrjaði at lesa á hægri lærustovni í Føroyum í august 2019. Kærarin vildi tó vera við, at lestrarbyrjanin ikki var í august 2019, men áðrenn, tí hann hevði lisið uttanlands lestrarárið 2018/2019 og hevði fingið góðskrivað fak í hesum sambandi.

Kærunevndin hjá Studna viðmerkti, at reglurnar um inntøkujavning eru galdandi fyri lestrarstuðul, sum Studni rindar eftir lóg um lestrarstuðul. Lestrarbyrjan í mun til lóg um lestrarstuðul má tí vera, tá tann lesandi byrjar á útbúgving í Føroyum og reglurnar um inntøkujavning verður viðkomandi, óansæð hvat viðkomandi hevur gjørt frammanundan.

Í hesum føri er kærarin hildin uppat á útbúgving uttanlands, og er byrjaður á aðra útbúgving í Føroyum. Útbúgvingin á føroyska lærustovninum er ikki júst tann sama útbúgvingin, sum tann kærarin las uttanlands. Tað, at kærarin hevur fingið góðskrivað nøkur fak, sum stytta útbúgvingina, broytir ikki hetta. Talan er heldur ikki um skiftislestur. *Kærunevndin hjá Studna staðfesti avgerðina hjá Studna.*

## Inntøkujavning av lestrarstuðli
### Mál nr. 20/00062

Í málinum varð kært um, at Studni hevði inntøkujavnað studning orsaka av A-inntøku, sum var útgoldin í lestrartíðini. Kærarin sigldi áðrenn hann í august 2019 fór undir útbúgving og fekk útgoldið hýru í oktober 2019. Kærarin vísti á, at inntøkan sum hann fekk útgoldið í oktober 2019 var forvunnin, áðrenn hann byrjaði lesturin.

Kærunevndin hjá Studna vísti á, at tað í § 8 a, stk. 2 í lóg um lestrarstuðul er ásett, at inntøkujavnað verður ikki í mun til A-inntøku, ið er útgoldin innan lestrarbyrjan og fyrsta heila mánaðin eftir, at útbúgvingin er byrjað. Í hesum føri byrjaði kærarin útbúgvingina í august 2019. Inntøkujavnað verður tí ikki í mun til A-inntøku, ið er útgoldin innan lestrarbyrjan og fyrsta heila mánaðin eftir, at útbúgvingin er byrjað. Men inntøkujavnast skal fyri inntøku, sum er útgoldin í oktober mánaða. Avgerandi er, nær inntøkan er útgoldin. Hædd verður ikki tikin fyri, nær inntøkan er forvunnin.

*Kærunevndin hjá Studna staðfesti avgerðina hjá Studna.*

# 7/KÆRUNEVNDIN Í LENDISMÁLUM

## NEVNDIN

Í Kærunevndini í lendismálum sita:
- Elsa Østergaard, løgfrøðingur og forkvinna í nevndini
- Fríður P. Dalsgarð, verkfrøðingur
- Bárður Dam í Baiansstovu, arkitektur

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærunevndin í lendismálum viðger kærur um:
- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt.
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti.
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um tinglýsing.
- Avgerðir eftir lógini um eigaraíbúðir.
- Avgerðir eftir lógini um bygging.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 komu 11 kærur til Kærunevndina í lendismálum. Hetta er nógv færri enn í 2019, tá 32 kærur vórðu móttiknar. Í 2018 var talið av kærum 17.

Eins og undanfarin ár eru flestu kærurnar um bygging. Heili 9 av kærunum vóru um bygging, 1 um ognartøku og 1 kæra var um viðurskifti, sum fella uttan fyri virkisøkið hjá Kærunevndini í lendismálum.




MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## AVGREIDD MÁL

Kærunevndin í lendismálum hevði hetta árið eina skrivliga viðgerð og 8 fundir og avgreiddi 18 mál, sum eru nógv færri enn undanfarnað ár, tá 36 mál vórðu avgreidd. Í 2018 avgreiddi nevndin 24 mál.

Sum vant vóru flestu avgreiddu málini um bygging og vóru tey 10 í tali hetta árið. Harumframt vóru 2 mál um matrikulering og sundurbýti, 2 mál um ognartøku, 1 mál um tinglýsing og 3 mál vóru um annað, sum fellur uttan fyri virkisøkið hjá kærunevndini.



## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Byggimál | 18 | 20 | 10 |
| Matrikulering/sundurbýti | 2 | 10 | 2 |
| Tinglýsing | 1 | 0 | 1 |
| Ognartøka | 0 | 0 | 2 |
| Annað | 3 | 6 | 3 |
| **Í alt** | **24** | **36** | **18** |

## AVGREIÐSLAN

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 5 | 12 | 8 |
| Broytt | 1 | 1 | 0 |
| Heimvíst | 4 | 4 | 1 |
| Avvíst | 6 | 10 | 3 |
| Burturfallin | 2 | 3 | 1 |
| Steðgandi virknað | 3 | 2 | 2 |
| Kæra afturkallað | 3 | 1 | 1 |
| Uppafturtøku | 0 | 3 | 2 |
| **Í alt** | **24** | **36** | **18** |




## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2020 var góðar 5½ mánaðir. Til samanberingar kann viðmerkjast, at miðal viðgerðartíðin í 2019 var 3 mánaðir og 21 dagar og í 2018 var viðgerðartíðin góðar 3½ mánaðir. Strembað verður altíð eftir, at viðgerðartíðin verður so stutt sum gjørligt, og mett verður, at viðgerðartíðin hevur verið sera góð seinastu árini og at hon enn liggur á einum nøktandi støði.

# SERLIGA ÁHUGAVERD MÁL

## Mál nr. 19/00282

**Kærunevndin hevur viðgjørt eitt kærumál, har kært varð um, at Umhvørvisstovan hevur ásett marknaðaprís fyri sundurbýti av matr.nr. x.**

Kærarin metir, at Umhvørvisstovan hevur sett marknaðarvirðið ov høgt, og at virðisgjaldið samsvarandi § 4, stk. 2, nr. 2 í kunngerð nr. 14 frá 11. februar 2009 um gjøld eftir matrikullógini, sum er 2 % av marknaðarvirðinum, tí er ásett av skeivum virði. Sambært § 40, 2. pkt. í lóg um matrikulering og sundurbýti, ásetur landsstýrismaðurin greiniligar reglur um, hvussu marknamerki skulu vera og setast, á hvønn hátt tey arbeiði, sum henda lóg fatar um, skulu verða gjørd, og ásetur gjaldið fyri tey. Landsstýrismaðurin hevur í kunngerð nr. 14 frá 11. februar 2009 um gjøld eftir matrikullógini, ásett nágreiniligar reglur um gjøld v.m. Í § 4, stk. 2, nr. 2 í kunngerðini um gjøld eftir matrikullógini, er ásett, at gjaldið fyri virðið á lutinum er 2% av marknaðarvirðinum.

Upplýst er í málinum, at kærarin hevur keypt matrikul nr. x í sambandi við bygging av leiguíbúðum. Sølan varð skipað sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn. Lýst varð í miðlum, almennir fundir vórðu hildnir v.m., hetta fyri at tryggja hægsta prís. Kærarin er bundin av kommununi at veita ávísar skyldur í nógv ár fram í tíðina. Kærarin kann ikki selja ella sundurbýta stykkið, soleiðis sum vinnustykkir kunnu. Hesar skyldur og avmarkingar hava sjálvsagt eina neiliga ávirkan á prísásetingina. Kærarin vísir m.a. á, at hann meinar, at 2% skal rindast av keypsprísinum. Umhvørvisstovan viðmerkir m.a., at tey eru ikki ósamd við kæraran í, at hann hevur keypt ognina fyri eina munandi lægri upphædd enn tann upphæddin, sum Umhvørvisstovan hevur nýtt sum marknaðarvirði, tí at sølan hevur so nógvar treytir við sær, og at hetta hevur ávirkað prísin neiliga.

Umhvørvisstovan vísir m.a. á, at talan er ikki um avmarkingar, sum eru lógarreguleraðar, ella á annan hátt koma sum ein fylgja av byggisamtykt, ella aðrari almennari regulering, men avmarkingarnar eru einsíðugt ásettar av kommununi, hóast tað hevði staðið kommununi frítt at selt ognina í fríum handli til ein nógv hægri prís.

Í avgerðini sæst m.a., at Umhvørvisstovan hevur avgjørt, at 2% skulu rindast av kvadratmeturprísi fyri aðra jørð, sum er 800 kr.

Í telduposti til kæraran, frá november 2019, hevur Umhvørvisstovan upplýst, at prísásetingin á stykkinum er gjørd út frá einum mettum marknaðarprísi, har útgangsstøðið er prísurin á vinnustykkjum. Spurningurin er sostatt um hvussu marknaðarvirðið, eftir § 4, stk. 2, nr. 2 í kunngerðini, eigur at verða ásett. Kærunevndin viðmerkir, at hóast sølan er farin fram í almennum útboði, so er í hesum ítøkiliga førinum ikki talan um ein frían handil, hóast talan hevur verið um sølu til hægsta boð í einum almennum útboði, tí keyparin er bundin av fleiri treytum, sum kommunan einsíðugt hevur ásett í sambandi við almenna útboðið og hevur hetta havt eina neiliga ávirkan á prísin.

Viðmerkt verður, at talan í hesum føri er ikki um treytir, ella avmarkingar, sum eru ásettar við lóg, ella øðrum almennum ásetingum, ella sambært galdandi byggisamtykt.

Í sambandi við kærumálsviðgerðina hevur Umhvørvisstovan víst á, at spurningurin um marknaðarvirðið, vísandi til § 4, stk. 2 nr. 2 í kunngerðini, er royndur í bæði hægstarætti (mál nr. 144/2017) og eisini er spurningurin royndur í Føroya rætti (mál nr. BS1054/2016) har tað ítøkiliga framgongur, at marknaðarvirðið skal roknast

fyri tað fulla handilsvirðið, uttan at roknast skulu uppí møguligar avmarkingar, sum kommunan ásetir á nýtsluna, sum ikki eru grundaðar á lóggarreglur.

Kærunevndin hevur eftir eina gjøgnumgongd av kærumálinum mett, at hendan avgerðin er í tráð við tí praksis sum er á økinum og tí er tað einki sum talar fyri at seta avgerðina hjá Umhvørvisstovuni til síðis.

Kærunevndin metti, at marknaðarvirðið í § 4, stk. 2, nr. 2 í kunngerðini, er tað virðið, sum ein keypari vanliga vildi keypt ognina fyri, samsvarandi tí slagi og útnyttilsismøguleikum, sum ognin hevur, tó einans við teimum avmarkingum sum koma orsakað av galdandi lóg, almennum reguleringum, ella byggisamtykt.

***Kærunevndin í lendismálum avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.***

## Mál nr. 19/00264

**Kærunevndin hevur viðgjørt eitt kærumál, har kært varð um, at Umhvørvisstovan hevur burturvíst skeyti frá tinglýsing, tí sølan av matr.nr. x ikki er samtykt á aðalfundi.**

Kært verður vegna búgv, sum er seljari av nevndu ogn, vegna arvingarnar. Ein av arvingunum er umrøddi felagsskapur. Advokaturin vísir m.a. á, at tað greitt framgongur í grein 13 í viðtøkunum fyri felagsskapin, at tað er nevndin, sum hevur heimildina at tekna felagsskapin. Grein 13 er greitt orðað, bæði við yvirskriftini "Tegningsret" og við einum tekningarrætti fyri nevndina, sum heilt greitt er uttan avmarkingar. Tað er bæði viðurkent av dómstólunum, myndugleikunum, og løgfrøðingum sum heild, at tekningarreglan staðfestir hvør kann binda eitt felag.

Grein 12 hevur bert eina yvirskipaða áseting um eftir hvørjum leisti, umsitingin skal fara fram, men hetta hevur einki við tekningarreglurnar at gera, og tí meta bæði seljari og keypari, at grundarlag er ikki fyri burturvísingini av skeytinum.

Umhvørvisstovan hevur burturvíst skeytið frá tinglýsing, í august 2019, við teirri grundgeving, at sølan av matr.nr. x ikki er samtykt á aðalfundi.

Í § 10, stk. 1 í tinglýsingarlógini er ásett, at um privat skjal skal kunna tinglýsast, skal tað eftir sínum innihaldi fastseta, stovna, broyta ella taka av rættindi í ávísum føstum eigindómi ella í felagseigindómi, ið hoyrir til ávísan fastan eigindóm, og sýna sum útgivið ella viðtikið sambært grannastevnulógini ella hagalógini av honum ella teimum, sum eftir tingbókini – ella fyri pantibræv sambært flutningi – eru heimilað at ráða yvir viðkomandi rættindum, ella sum útgivið við samtykki hansara.

Kærunevndin viðmerkir, at omanfyri nevnda grein ásetir hvør, ið hevur heimild ella rættindi til at ráða yvir

ognini, sambært tingbókini. Eigarin av ognini hevur sum útgangsstøði rættin til at ráða. Í hesum ítøkiliga málinum er fleiri eigarar, sum eiga ognina. Talan er um arvingarnar til eitt búgv.

Tann eini av eigarunum av matr.nr. x er felagsskapur, sum ikki er skrásett partafelag. Fyri felagsskapin eru serligar viðtøkur galdandi.

Tinglýsingarstovan viðmerkir m.a., at grein 13 í viðtøkunum ásetir ikki greitt, at stýrið kann tekna felagsskapin í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn. Grein 8 í viðtøkunum ásetir, at rættindi og skyldur hjá aðalfundinum m.a. eru yvirskipaðar avgerðir um virksemið hjá felagsskapinum, undir skipan av felagsskapinum. Grein 12 í viðtøkunum ásetir, at stýrið skal umsita viðurskiftini hjá felagsskapinum í samsvar við viðtøkurnar og eftir teimum leiðreglum, sum aðalfundurin hevur sambært viðtøkunum.

Tinglýsingarstovan leggur sostatt til grund, at sbr. grein 8 í viðtøkunum er aðalfundurin ovasti myndugleikin hjá felagsskapinum.

Tinglýsingarstovan viðmerkir, at søla av fastari ogn hevur so víðfevndan týdning, at ein aðalfundarsamtykt er neyðug, tá viðtøkurnar ikki nágreiniliga áseta, at stýrið sjálvt kann skriva undir eina slíka avgerð. Søla av fastari ogn er eiheldur ein vanligur partur av virkseminum hjá felagsskapinum.

Kærunevndin er samd við Tinglýsingarstovuni í, at tá viðtøkurnar fyri felagsskapin ikki áseta, hvussu søla av fastari ogn skal fara fram, og tá talan er um atgerð, sum ikki er vanlig og natúrlig í mun til virksemið hjá felagsskapinum, so verður mett, at neyðugt er við eini aðalfundarsamtykt í hesum føri.

Kærunevndin viðmerkir, at rættarpraksis vísir eisini greitt, at tá søla av fastari ogn ikki kann metast at verða partur av vanliga virkseminum hjá felagnum/stovninum, so er kravið, at aðalfundurin góðkennir søluna, sí t.d. U1967.572V og U1978.604Ø.

Sambært § 15, stk. 1 í tinglýsingarlógini skal Tinglýsingarstovan eftir innførsluna í dagbókina kannað eftir, um nakað eftir tingbókini kann vera til hindurs fyri tinglýsingini av viðkomandi skjali.

Í § 15, stk. 2 er ásett, at vísir tað seg, at skjalið eftir sínari náttúru als ikki kann tinglýsast í Føroyum, ella tinglýsing er eyðsæð ótørvandi til vernd rættarins, ella útgevari skjalsins – ella tann, sum ein almenn rættarstovnan viðkemur – hevur ikki heimild at ráða yvir teimum rættindum í eigindóminum, sum skjalið viðvíkur, verður tað burturvíst og ikki innført í tingbókina. Sama regla er galdandi, um so er at persónur, sum bert hevur treytaða heimild, útgevur skjal uttan at tilskila treytina. Burturvísing kann eisini fara fram, longu tá skjalið verður tilmeldað til dagbókina.

Mett verður, at Tinglýsingarstovan hevði heimild til at burturvísa skeytið hjá kæraranum frá tingbókini, við heimild sambært § 15, stk. 2 í tinglýsingarlógini, tí sølan av matr.nr. x var ikki enn samtykt á aðalfundi, tá skeytið varð latið inn til Tinglýsingarstovuna.

Tó átti Tinglýsingarstovan, í sambandi við burturvísingina, at víst til tær ásetingar í tinglýsingarlógini, sum avgerðin er grundað á, vísandi til § 23, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Tá viðtøkurnar fyri felagsskapin ikki áseta, hvussu søla av fastari ogn skal fara fram, og tá talan er um atgerð, sum ikki er vanlig og natúrlig í mun til virksemið hjá felagsskapinum, so metti kærunevndin, at neyðugt er við eini aðalfundarsamtykt í hesum føri.

***Kærunevndin í lendismálum avgjørdi at staðfesta hesa avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.***

# 8/VINNUKÆRUNEVNDIN

## NEVNDIN

Vinnukærunevndin verður samansett av trimum ella fimm limum, tá hon skal taka støðu til einstøk kærumál. Nevndin er mannað við formanninum ella næstformanninum og tveimum ella fýra limum við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Marjun Magnussen, løgfrøðingur og forkvinna í nevndini
- Jóhan Jógvansson Lamhauge, løgfrøðingur og næstformaður í nevndini

## VIÐGERÐARØKIÐ

Vinnukærunevndin viðger kærur um:

- avgerðir hjá Akstovuni eftir lóg um ferðslu
- avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi
- avgerðir hjá Jarðfeingi eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø
- avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu og lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
- avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal
- avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi
- avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir kunngerð um vápnaprógv
- Harumframt viðger Vinnukærunevndin kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 eru 25 kærur latnar Vinnukærunevndini. Hetta er meira enn tvífalt so nógvar kærur sum í 2019, tá 10 kærur vórðu latnar Vinnukærunevndini, og eisini meira enn í bæði 2018 og 2017, tá ávikavist 17 og 22 kærur vórðu latnar Vinnukærunevndini.

Flestu móttiknu kærurnar hetta árið eru um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og eru tær heili 14 í tali. Afturat teimum komu 6 mál inn um setanarprógv, 3 kærur um avgerðir hjá Akstovuni, 1 kæra um avgerð hjá Umhvørvisstovuni og 1 kæra um avgerð hjá Skráseting Føroya.



## AVGREIDD MÁL

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Akstovan | 6 | 3 | 1 |
| Fjarskiftiseftirlitið | 6 | 2 | 0 |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 7 | 7 | 13 |
| Landsverk | 0 | 0 | 0 |
| Setanarprógv | 3 | 1 | 5 |
| Skráseting Føroya | 2 | 0 | 0 |
| Umhvørvisstovan | 2 | 1 | 4 |
| Kappingareftirlitið | 1 | 1 | 0 |
| **Í alt** | **27** | **15** | **23** |

Tiknar vórðu 23 avgerðir í 2020. Hetta er nakað væl meira enn í 2019, tá 15 avgerðir vórðu tiknar.

## AVGREIÐSLAN

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 11 | 8 | 7 |
| Heimvíst | 0 | 2 | 3 |
| Avvíst | 3 | 1 | 5 |
| Burturfallin | 3 | 0 | 2 |
| Afturkallað | 2 | 0 | 1 |
| Kærufreist | 0 | 0 | 1 |
| Steðgandi virknaður | 3 | 2 | 1 |
| Uppafturtøka | 3 | 1 | 1 |
| Annað | 1 | 0 | 1 |
| **Í alt** | **27** | **15** | **23** |

# AKSTOVAN

### 1 AVGREITT MÁL

Vinnukærunevndin viðgjørdi í 2020 eitt mál um avgerð hjá Akstovuni. Málið snúði seg um inndragan av koyrirætti. Vinnukærunevndin avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá Akstovuni.

# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN




13 AVGREIDD MÁL

### 2 av málunum snúðu seg um lógirnar um djórasjúkur og um innflutning av vandamiklum djórum

Annað málið snúði seg um koppseting í sambandi við innflutning av kettu til Føroya og hitt málið var viðvíkjandi forðan fyri spjaðing av ridluskriða í Føroyum. Báðar kærurnar fullu burtur, tá Heilsufrøðiligu Starvsstovan broytti avgerðina viðvíkjandi innflutningi av kettu og tók málið viðvíkjandi spjaðing av ridluskriða upp til nýggja viðgerð.

### Eitt mál snúði seg um matvørulógina og merking av matvørum

Málið snúði seg yvirskipað um verju av brúkaranum fyri villleiðing í sambandi við matvørur, ið er eitt aðalmál í matvørulóggávuni, sum m.a. hevur til endamáls at tryggja brúkaranum rættar og greiðar upplýsingar um tær vørur, sum vera bodnar til sølu, soleiðis at brúkarin verður førur fyri at gera eitt veruligt val. Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og vísti á, at vøran í síni merking og marknaðarførslu villleiðir ella kann nýtast til at villleiða, sambært § 12 í matvørulógini.

### 10 mál snúðu seg um alilógina v.m.

Eitt mál snúði seg um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at sýta umsókn um aliloyvi. Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvstovuni og vísti m.a. á, at einans eitt loyvi til aling á sjónum av matfiski av laksi og sílum, kann verða latið á einum alifirði.

Vinnukærunevndin staðfesti eina avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at sýta umsókn um loyvi at ala tara og Vinnukærunevndin staðfesti eisini avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at áleggja hummarafiskarum at flyta hummaraútgerð teirra av ávísum aliøki.

7 av málunum, ið Vinnukærunevndin viðgjørdi um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni høvdu øll tilknýti hvørt til annað. Málini snúðu seg yvirskipað um góðkenning av rakstrarætlanum sambært rakstrarkunngerðini. Ásett er í rakstrarkunngerðini, at loyvishavarar hava ábyrgd av, at ein framhaldandi rakstrarætlan er fyri hvørt alibrúk og skulu hesar rakstrarætlanir sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til góðkenningar. Vinnukærunevndin heimvísti 3 av málunum til nýggja viðgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, 1 mál bleiv staðfest, 1 mál bleiv avvíst og kæraranum bleiv noktað uppafturtøku í 1 máli. Harumframt bleiv 1 mál afturkallað.

# SETANARPRÓGV




| | |
|---|---|
| Avvíst | 4 |
| Upplýsingarskyldan ikki hildin | 1 |

**5 AVGREIDD MÁL**

Ásett er í lógini um setanarprógv, at arbeiðsgevari, undir ávísum umstøðum, hevur skyldu at lata løntakara allar upplýsingar um allar treytir av týdningi fyri setanarvirðuskiftini – setanarprógv.

4 av málunum vórðu avvíst, tá ásetingar um setanarbræv vóru ásettar í sáttmálanum millum avvarðandi fakfelag og fíggjarmálaráðið. Tískil skuldi Vinnukærunevndin ikki taka støðu í málinum, sbrt. § 1, stk. 3 í lógini um setanarprógv.

Í einum máli metti Vinnukærunevndin ikki, at arbeiðsgevarin hevði hildið upplýsingarskyldu sína mótvegis arbeiðstakaranum sambært lógini um setanarprógv.

# UMHVØRVISSTOVAN




| | |
|---|---|
| Loyvt frávik frá kærufreist | 1 |
| Noktað partsstøðu | 1 |
| Staðfest | 1 |
| Sýtt steðgandi virkna | 1 |

**4 AVGREIDD MÁL**

Í einum máli avgjørdi Vinnukærunevndin at loyva fráviki frá kærufreistini, tá myndugleikin hevði latið kæraranum ófullfíggjaða kæruvegleiðing, sum av órøttum gav kæraranum ta fatan, at freistin at lata kæru til Vinnukærunevndina var longd.

Hinar 3 avgerðirnar hjá Vinnukærunevndini vóru viðvíkjandi kæru um avgerð hjá Umhvørvisstovuni eftir elveitingarlógini, og høvdu allar 3 avgerðirnar tætt tilknýti hvør til aðra. Talan var í roynd og veru um sama mál, har Vinnukærunevndin tók tríggjar sjálvstøðugar avgerðir. Ein avgerð varð tikin viðvíkjandi partsstøðu hjá eina partinum í málinum, ein avgerð varð tikin viðvíkjandi steðgandi virknaði og endaliga varð ein avgerð eisini tikin viðvíkjandi tí materiellu avgerðini hjá Umhvørvisstovuni, har Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Vinnukærunevndin viðgjørdi í hesum máli m.a. áhugaverdan spurning um partsstøðu í kærumáli eftir § 5 í lógini um vinnukærunevnd og § 10 í kunngerðini um vinnukærunevnd – og tulking av hesum ásetingum um partsstøðu.

Vinnukærunevndin vísti á, at tað ikki er greitt - hvørki í lógarteksti, viðmerkingunum, kunngerðini ella aðra staðni - hvønn leiklut ein triðimaður sambært grein 5 í lóg um Vinnukærunevnd hevur sum partur í kærumáli. Sambært orðaljóðinum í grein 5 í løgtingslóg um Vinnukærunevnd kann triðimaður "gerast partur í kærumálinum og harvið stuðla kæraranum ella tí myndugleika, ið kært verður um." Orðavalið í ásetingini um "og harvið stuðla" týðir tó uppá, at heimildirnar hjá triðiparti sum partur í máli ikki eru heilt uttan avmarkingar. Um ætlanin var, at triðimaður skuldi kunna gerast partur í málinum uttan avmarkingar, hevði eingin orsøk verið til, at orðingin "og harvið stuðla kæraranum ella tí myndugleika, ið kært verður um" var við í lógartekstinum.

Vinnukærunevndin metti tí við støði í einari tulking av orðaljóðinum av grein 5 í lóg um Vinnukærunevnd, at ein stuðlandi partur ikki hevur somu møguleikar í kærumálsviðgerðini sum kærarin og myndugleikin, men at rættarstøðan hjá tí stuðlandi partinum í kærumálinum er avmarkað av, hvørjar heimildir kærarin og myndugleikin hava, m.a. við atliti til rættarligan áhugað, og hvat kæran snýr seg um.

Hendan tulkingin er stuðlað av, at kærufreistin fyri kærur eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagn til Vinnukærunevndina er 4 vikur, sambært § 4, stk. 2 í lóg um Vinnukærunevnd. Um ein stuðlandi partur, sambært § 5 í lóg um Vinnukærunevnd, hevði havt somu (parts)heimildir sum kærarin sjálvur, hevði hetta havt við sær, at tann stuðlandi parturin hevði kunnað umgingið lógarásettu kærufreistina.

## GJALD FYRI KÆRUR

Vísandi til § 7 í kunngerð nr. 78 frá 28. august 2008 um vinnukærunevnd er gjald ásett fyri viðgerð av ávísum kærum til Vinnukærunevndina. Kostnaðurin fyri kæruviðgerð er settur til kr. 4.000,00, uttan tá kæran viðvíkur viðurskifti, sum ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemið hjá viðkomandi, sum kærir. Í slíkum førum er kostnaðurin kr. 2.000,00.

Í 2020 er gjald á kr. 4.000 rindað tvær ferðir.

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál hjá Vinnukærunevndini í 2020 var áleið 3 ½ mánað. Í 2019 var viðgerðartíðin næstan 5 mánaðir. Sostatt var miðal viðgerðartíðin í 2020 eitt vet styttri enn miðal viðgerðartíðin í 2019. Viðgerðartíðin verður mett at vera nøktandi fyri hetta slagið av málum, tá atlit skal takast til ummælis- og hoyringsfreistir, og talan stundum er um fløkt mál við rúgvismiklum skjalatilfari.

# 9/PSYKIATRISKA SJÚKLINGAKÆRUNEVNDIN

## NEVNDIN

Limir í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini eru:

- Nella Festirstein,
  løgfrøðingur og forkvinna í nevndini
- Jeaneth Løkjá, lækni
- Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærast kann til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina um persónur í sambandi við innlegging á psykiatrisku deild verður útsettur fyri tvingsil.

Hin 1. oktober 2009, tvs. fyri 11 árum síðani, kom nýggj psykiatrilóg í gildi og við henni bleiv rættartrygdin hjá føroysku sjúklingunum á sama støði, sum í hinum norðanlondum. Við hesi lógini, fekk føroyski sjúklingurin nú møguleika at kæra tvingsilsinntriv til eina kærunevnd og fekk tilnevnt ein sjúkligarráðgeva í hesum sambandi.

Psykiatrilógin byggir á tað grundsjónarmið, at tvingsil í samband við innlegging, uppihald og viðgerð á psykiatriskari deild eigur at verða fyribyrgt og sloppið undan so vítt tað yvirhøvur ber til. Hinvegin ber ikki til at sleppa heilt undan tvingsli á hesum økinum. Tað er sambært lógini loyvt at brúka ymisk sløg av tvingsli, tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí.

Tvingsilsinntrivini eru til dømis tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhald á deildini, tvingsilsviðgerð, brúk av tvingsilsfastspenning og brúk av kropsligari megi (t.e. at starvsfólk halda sjúklinginum føstum).

Rættartrygdin hjá sjúklingunum er vard við at ein týðandi partur av lógini inniheldur eina røð av ásetingum, ið hava til endamál at avmarka ella, um til ber, at fyribyrgja nýtslu av tvingsli.

Nevndin skal hava tikið avgerð sum skjótast, og innan 7 gerandisdagar aftaná kæran er móttikin, tá talan er um tvingsilsviðgerð. Psykiatriska sjúklingakærunevndin viðger kærur um allar tvingsilsfyriskipanir á psykiatrisku deild.

Allir sjúklingar, sum eru undir tvingsilsfyriskipanum, fáa tilnevnt ein sjúkligaráðgeva. Uppgávan hjá sjúklingaráðgevanum er at vitja sjúklingin, og hava støðugt samband við hann. Ráðgevin skal leiðbeina og geva ráð í øllum viðvíkjandi innlegging, uppihaldi og viðgerð á psykiatrisku deild. Harumframt skal ráðgevin hjálpa sjúklinginum við møguligari kæru og vera hjástaddur, tá ið kæran verður viðgjørd í kærunevndini. Skipanin við sjúkligaráðgevum skal tryggja, at psykiatriskir sjúklingar, sum vera lagdir undir tvingsil, fáa rætt til stuðul og hjálp, bæði menniskjaliga og rættarliga frá óheftum persóni, ið hava neyðuga førleikan.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 vórðu 10 kærur latnar Psykiatrisku sjúklingakærunevndini. Hetta er áleið tað sama sum í 2019, tá 11 kærur vórðu latnar nevndini.

Hvør kæra til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina inniheldur ofta kærur um fleiri ymisk tvingsilsinntriv og so var eisini hetta árið. Í teimum 10 kærunum varð kært um tilsamans 14 tvingsilsinntriv.




MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## AVGERÐIRNAR

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 4 | 4 | 3 |
| Tvingsilsfastspenning | 1 | 1 | 1 |
| Tvingsilsafturhald | 5 | 3 | 3 |
| Bráðfeingis sissandi heilivág | 3 | 3 | 2 |
| Fasthaldan | 1 | 0 | 0 |
| Tvingsilsviðgerð | 0 | 3 | 3 |
| Tvungin uppfylging | 0 | 0 | 0 |
| Annað (uttanfyri heimildarøki) | 4 | 3 | 2 |
| **Í alt** | **18** | **17** | **14** |

Psykiatriska sjúklingakærunevndin hevur hildið 8 fundir í 2020. Í einum føri varð kæran avvíst, tí hon fall uttanfyri heimildarøkið hjá kærunevndini og í einum føri varð kæra afturkallað. Nevndin viðgjørdi soleiðis 12 tvingsilsinntriv og avgjørdi at góðkenna 10 av hesum, meðan 2 ikki vórðu góðkend.



## SJÚKLINGARÁÐGEVAR

Sjúklingaráðgevar hava verið tilnevndir 46 ferðir í 2020, sum er munandi fleiri ferðir enn í 2019, men á leið tað sama sum í 2018. Tað sæst, at tilnevningin av sjúklingaráðgevum fylgir ikki talinum av tvingsilsfyriskipanum. Ein orsøkin til hetta er, at sami sjúklingur kann vera fyri fleiri tvingsilsinntrivum um somu tíð, men hevur ein og sama sjúklingaráðgeva.




TAL AV TILNEVNINGUM AV SJÚKLINGARÁÐGEVUM

## TVINGSILSFYRISKIPANIR Á PSYKIATRISKA DEPLINUM Í 2020

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 23 | 19 | 23 |
| Tvingsilsafturhald | 19 | 7 | 20 |
| Tvingsilsfastspenning | 21 | 26 | 32 |
| Tvingsilsviðgerð | 5 | 7 | 7 |
| Verjutiltøk | 0 | 0 | 0 |
| Persónlig vernd | 1 | 0 | 1 |
| Sissandi heilivágur | 12 | 26 | 25 |
| Fasthaldan | 4 | 3 | 4 |
| **Í alt** | **85** | **88** | **112** |

Tølini frá Psykiatriska deplinum vísa, at tvingsilsfyriskipanirnar í 2020 eru munandi fleiri enn í 2019. Størsta hækkingin í mun til árið frammanundan er tvingsilsafturhaldan, sum er hækkað frá 7 í 2019 til 20 í 2020.

Kærustovnurin hevur ikki innlit í orsøkina til broytingarnar í tølunum frá ári til ár, men skal viðmerkja, at tá talan er um so smá tøl, kann einstakur sjúklingur, sum er fyri sama tvingsilsinntrivi fleiri ferðir sama ár, hava stóra ávirkan á tølini.

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin fyri kærurnar hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini er umleið 8 dagar í 2020, og hóast hetta er 2 dagar longri enn miðal viðgerðartíðin í 2020, ið var 6 dagar, er talan um eina góða viðgerðartíð.

# 10/SKULDARUMSKIPANAR-NEVNDIN

## NEVNDIN

- Í Skuldarumskipanarnevndini sita:
- Jógvan Páll Lassen,
  lógarkønur og formaður í nevndini
- Jógvan Emil Nielsen, roknskaparkønur
- Nella Festirstein, fyrisitingarkøn

## VIÐGERÐARØKIÐ

Nevndin viðger umsóknir um umskipan av almennari skuld, sí løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 fekk Skuldarumskipanarnevndin 16 umsóknir. Hetta er lægsta talið av umsóknum, síðan Skuldarumskipanarnevndin byrjaði sítt virksemi í 2005. Fyrstu árini vóru nógv fleiri umsóknir, men seinastu tíggju árini hevur talið av umsóknum ligið á 25 í miðal.



## MÁLINI UPPBÝTT EFTIR SKULDARSLAGI

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Ymisk skuld | 5 | 7 | 4 |
| Skattaskuld | 7 | 10 | 5 |
| Mvg | 1 | 2 | 3 |
| Vinnulán og veðhaldslán | 0 | 0 | 1 |
| Lestrarlán | 1 | 1 | 1 |
| Rentur | 4 | 6 | 2 |
| **Í alt** | **18** | **26** | **16** |

## AVGREIDD MÁL

Skuldarumskipanarnevndin hevði 4 fundir í 2020, og vórðu 22 mál avgreidd. Hetta er á nakað sama støði, sum undanfarnu tvey árini, tá ávikavist 25 og 20 mál vórðu avgreidd.




## AVGREIDD MÁL UPPBÝTT EFTIR SKULDARSLAGI

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Ymisk skuld | 14 | 5 | 12 |
| Skattaskuld | 2 | 10 | 3 |
| Mvg | 2 | 1 | 2 |
| Vinnulán og veðhaldslán | 0 | 0 | 1 |
| Lestrarlán | 0 | 2 | 1 |
| Rentur | 2 | 7 | 3 |
| **Í alt** | **20** | **25** | **22** |

## MÁLINI VÓRÐU AVGREIDD SOLEIÐIS

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Full ella lutvís eftirgeving | 7 | 10 | 11 |
| Veita gjaldsskáa/avdráttur settur niður | 1 | 4 | 3 |
| Steðga rentutilskriving | 3 | 1 | 0 |
| Víst til Skiftirættin, ella privata loysn | 4 | 0 | 0 |
| Umsókn ikki gingin á møti | 2 | 4 | 0 |
| Burturfallin mál | 3 | 4 | 8 |
| Víkja fyri lániskuld, flyta veðbræv í aðra ogn | 2 | 2 | 0 |
| **Í alt** | **20** | **25** | **22** |

## MÁLINI UPPBÝTT EFTIR SKULDARSLAGI

Skuldarumskipanarnevndin eftirgav í alt umleið kr. 6.213.402 í 2020. Skuldin er uppbýtt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Rentuskuld | uml. kr. | 3.964.439 |
| Landsskattur | uml. kr. | 1.168.887 |
| Mvg-skuld | uml. kr. | 1.080.076 |

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina. Hini tølini kunnu vera broytt eitt sindur, frá tí umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Viðvíkjandi eftirgeving av mvg-skuld skal viðmerkjast, at sum oftast so er meginparturin av mvg-skuldini rentutilskrivingar. Tá talan er um mvg-skuld, verður renta eisini tilskrivað av rentuskuldini.

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2020 var á leið 6½ mánaðir og má sigast at vera góð fyri hetta slagi av málum. Havast skal í huga, at upplýsingar skulu innheintast frá TAKS og umsøkjara umframt, at kommunur skulu taka avgerð um teirra part av skuldini, áðrenn Skuldarumskipanarnevndin kann gera sína niðurstøðu. Til samanberingar kann nevnast, at miðal viðgerðartíðin í 2019 og 2018 var á leið 5 mánaðir. Viðgerðartíðin á hesum øki hevur annars ofta ligið á uml. 8 mánaðum.

# 11/FJØLMIÐLANEVNDIN

## NEVNDIN

Í Fjølmiðlanevndini sita:
- Jan Sjóstein, løgfrøðingur og formaður
- Ingrid Bjarnastein, tíðindafólk
- Jens Hákun Leo, ábyrgdarblaðstjóri
- Anna Paulina Leo Olsen, vísindaligt hjálparfólk

## VIÐGERÐARØKIÐ

Fjølmiðlanevndin viðger kærur um:
- Brot á góðan fjølmiðlasið sambært teimum leiðreglum, sum nevndin hevur ásett við heimild í lógini um fjølmiðlaábyrgd.
- Rættin at svara aftur, undir hesum skylduna til at almannakunngera eitt aftursvar, og spurningin um innihald, snið og staðseting.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 eru 2 mál innkomin til Fjølmiðlanevndina og snúðu tey seg bæði um brot á góðan fjølmiðlasið. Talið av innkomnum málum er nakað lægri enn undanfarna ár.




MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## AVGREIDD MÁL

Fjølmiðlanevndin hevði 3 fundir í 2020, har 3 mál vórðu avgreidd.

Sum myndin vísir, so var eitt mál avvíst. Málið varð avvíst, tí kærarin hevði kært ov seint og ongar serligar umstøður vóru, ið góvu grundarlag fyri at víkja frá kærufreistini. Hini bæði málini vórðu viðgjørd av nevndini og í eina førinum fekk kærarin partvís viðhald, meðan kærarin ikki fekk viðhald í hinum málinum.




AVGREIDD MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## VIÐGERÐARTÍÐIN

Miðal viðgerðartíðin í 2020 var knappar tríggjar mánaðir og er hetta á leið tann sama viðgerðartíðin sum undanfarin ár. Viðgerðartíðin verður mett at vera nøktandi fyri hetta slagið av málum, tá atlit eisini skal takast til ummælis- og hoyringsfreistir í sambandi við at upplýsa málini til fulnar.

# 12/HØVUÐSBARNAVERNDAR-NEVNDIN

## NEVNDIN

Í Høvuðsbarnaverndarnevndini sita:
- Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna
- Suni Poulsen, sálarfrøðingur
- Ingvør Justinussen, barnasakkøn

## VIÐGERÐARØKIÐ

Høvuðsbarnaverndarnevndin viðger mál um:
- Umsorganaryvirtøku
- Samveru
- Familjuviðgerð
- Bráðfeingisavgerðir

## MÓTTIKIN TILMÆLI OG BRÁÐFEINGIS AVGERÐIR TIL GÓÐKENNINGAR



## AVGERÐIR




Tilsamans 141 mál vórðu móttikin og viðgjørd í Høvuðsbarnaverndarnevndini í 2020. Ongantíð áður hevur Høvuðsbarnaverndarnevndin móttikið og viðgjørt so nógv mál.

Málini snúgva seg millum annað um umsorganaryvirtøku av børnum, um samveru millum somu børn og foreldur teirra ella onnur, um inn- og útskrivan av stovni, um familjuviðgerð ella um góðkenning av bráðfeingis avgerðum hjá barnaverndarnevndunum. Harumframt verða nevndu fyriskipanir regluliga endurskoðaðar av Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Talið av málum samsvarar hvørki við talið av avgerðum ella talið av børnum, tí sama mál kann til dømis fevna um bæði umsorganaryvirtøku og samveru við ymiskar partar, ella um familjuviðgerð til eina familju við fleiri børnum. Harumframt kann tilmæli viðvíkjandi einum barni verða lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan fleiri ferðir um árið.

Í 2020 tók Høvuðsbarnaverndarnevndin tilsamans 318 avgerðir. Hetta eru munandi fleiri avgerðir enn í 2019, tá talið av avgerðum var 216.

Tiknu avgerðirnar í 2020 snúðu seg um 106 børn. Ongantíð áður hevur talið av børnum verið so høgt. Talið av børnum var til samanberingar 81 í 2019.

Samanumtikið boðað hagtølini frá 2020 frá einum munandi øktum virksemi í Høvuðsbarnaverndarnevndini.

## AVGERÐIR Í MUN TIL TILMÆLI



## BØRN




## ALDURSBÝTI Á BØRNUNUM



## FYRISKIPANIR




## UMSORGANARYVIRTØKA OG LONGD FYRISKIPAN

Við ársenda í 2020 vóru í alt 92 umsorganaryvirtikin børn í Føroyum. Av hesum vóru 70 í fosturheimi, 21 børn vóru á stovni í Føroyum, og 1 barn var á stovni uttanlands.

Við ársenda í 2020 vóru harumframt 12 ung í aldrinum 18 – 21 í longdari fyriskipan. Av hesum vóru 9 ung í fosturheimi, 1 var á stovni í Føroyum, og 2 ung vóru á stovni uttanlands.

## UMSORGANARYVIRTØKA

Allar avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini eru grundaðar á tilmæli frá barnaverndartænastunum kring landið. Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur sostatt ikki møguleika at taka mál upp av sínum eintingum.

Tá Høvuðsbarnaverndarnevndin avger, at barn skal verða umsorganaryvirtikið, fevnir avgerðin eisini um, hvørt barnið skal setast í fosturfamilju ella á stovn.

Í 2020 vórðu 13 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð. Av hesum 13 børnunum vórðu 9 børn sett í fosturfamilju, meðan 4 vórðu sett á stovn. Aldursbýtið á teimum 13 børnunum var frá 0 til 16 ár.

Í 6 málum avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki at taka undir við tilmælinum um umsorganaryvirtøku av børnunum. Høvuðsbarnaverndarnevndin metti í hesum málum ikki, at grundarlag var fyri umsorganaryvirtøku. Ein umsorganaryvirtøka av einum barni er ein sera inntrívandi avgerð. Av hesi orsøk kann ein umsorganaryvirtøka einans fremjast, um tað er neyðugt, og tá ið fyribyrgjandi fyriskipanirnar ikki verða mettar at kunna skapa eitt nøktandi úrslit fyri barnið.

8 børn blivu varandi umsorganaryvirtikin í 2020. Børn kunnu verða varandi umsorganaryvirtikin, um tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan, ella um barnið, eftir at tað hevur verið til fosturs í minst 5 ár, hevur fingið so sterkt tilknýti til hesi, at tað er av stórum týdning og best fyri barnið, at tað verður verandi hjá fosturforeldrunum.

Øll 8 børn vóru varandi umsorganaryvirtikin orsakað av sterka tilknýtinum til fosturforeldrini. Í 6 av teimum 8 málunum var varandi umsorganaryvirtøkan somuleiðis grundað á, at tað var mett sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan.

## Á STOVN UTTANLANDS

Høvuðsbarnaverndarnevndin ansar eftir, at barn verður sett á rættan samdøgursstovn. Um einki nøktandi tilboð finst í Føroyum, kann barn verða sett á stovn uttanlands.

5 børn vórðu sett á stovn uttanlands í 2020 – øll í Danmark. Av teimum 5 børnunum vóru 3 børn, ið frammanundan vóru umsorganaryvirtikin við uppihaldi á stovni uttanlands. Hini bæði børnini vóru frammanundan í longdari fyriskipan við uppihaldi á stovni uttanlands. Einki barn bleiv sostatt fyri fyrstu ferð sett á stovn uttanlands í 2020.

Tvey av teimum 5 børnunum, ið vóru sett á stovn uttanlands í 2020, fóru seinni í 2020 úr fyriskipani sambært barnaverndarlógini. Í staðin fóru hesi undir fyriskipan undir Almannaverkinum.

## SAMVERA

Høvuðsbarnaverndarnevndin ásetur samveru við umsorganaryvirtikin børn.

Barnið hevur rætt til samveru við bæði foreldur uttan mun til foreldramyndugleika, og harumframt kann barnið hava ásetta samveru við ommur, abbar, systkin, fyrrverandi fosturforeldur ella onnur, ið standa tí nær.

Hóast dentur verður lagdur á, at umsorganaryvirtikin børn kenna sína familju og sítt upphav, kann samvera í serligum førum verða noktað foreldrunum í styttri ella longri tíðarskeið. Hetta hendi í 9 avgerðum í 2020. Tess eldri og meira búgvið barnið er, tess størri ávirkan kann barnið hava á, hvussu samveran verður skipað.

## FAMILJUVIÐGERÐ

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann innskriva familjur til samdøgurs- ella dagviðgerð á Familjudeplinum undir Eind 10 í Almannaverkinum. Familjuviðgerð á Familjudeplinum er ein fyribyrgjandi fyriskipan, har foreldur við menningarmøguleikum kunnu fáa munagóða hjálp í rættari tíð, umframt at møguleiki er fyri at kanna førleikarnar hjá foreldrunum nærri.

Í 2020 vórðu 7 familjur, við tilsamans 10 børnum, innskrivaðar til viðgerð á Familjudeplinum sum samdøgurstilboð. Tvær av hesum familjum blivu fyrst innskrivaðar til samdøgurstilboð og seinni til dagtilboð. Harumframt var ein familja, ið í 2019 varð innskrivað til samdøgurstilboð, sum í 2020 bleiv innskrivað til dagtilboð.

Í alt vóru 10 avgerðir tiknar í 2020 um familjuviðgerð á Familjudeplinum, antin sum dag- ella samdøgurstilboð. Talið av avgerðum var sostatt munandi hægri í 2020 enn í 2019, tá 3 avgerðir blivu tiknar um familjuviðgerð.

## AVGERÐIR UM UNG YVIR 18 ÁR, SUM HALDA FRAM Í FYRISKIPAN




Umsorganaryvirtøka heldur uppat, tá tann ungi fyllir 18 ár.

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann tó avgera, at tann ungi kann halda fram í longdari fyriskipan undir barnaverndarlógini, um tørvur er á stuðli eina tíð aftrat, fyri at tann ungi skal kunna megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Tað er til dømis ikki óvanligt, at ung halda fram í fram í longdari fyriskipan, til tey hava lokið miðnámsprógv.

Fyriskipanin kann bert halda fram, um tann ungi ynskir tað.

Longd fyriskipan undir barnaverndarlógini eigur bert at verða longd, um tað er sannlíkt, at tann ungi fer at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Um tað til dømis er sannlíkt, at tann ungi fer at hava varandi tørv á bústovni undir Almannaverkinum, verður tann ungi ikki settur í longda fyriskipan, men eigur at fáa tilboð eftir forsorgarlógini.

Í 2020 vórðu 6 avgerðir tiknar um longda fyriskipan.

## BRÁÐFEINGIS AVGERÐIR

Barn kann verða tikið úr heiminum uttan rættarúrskurð, um vandi er fyri, at tað verður skatt av at verða verandi í heiminum. Eisini kann foreldrum verða noktað at fáa barn heimaftur, um vandi er fyri, at barnið verður skatt, um tað fer heim.

Somuleiðis kann ein bráðfeingis avgerð verða tikin, um eitt barn er uttan umsorgan, tvs. at eingin er at taka sær av barninum.

Tað er barnaverndarnevndin í økinum, ið tekur bráðfeingis avgerðina. Avgerðin skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar beinanvegin, og í seinasta lagi 2 yrkadagar eftir at hon er tikin.

Um bráðfeingis avgerð verður góðkend av Høvuðsbarnaverndarnevndini, kann avgerðin í mesta lagi standa við í 4 mánaðir. Í tí tíðarskeiðinum eigur barnaverndartænastan at kanna umstøðurnar hjá barninum og foreldrunum, soleiðis at støða kann verða tikin til, hvørt barnið eigur at fara heim aftur, ella um tað eigur at verða umsorganaryvirtikið.

Í 2020 viðgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin 11 bráðfeingis avgerðir. 9 avgerðir vórðu góðkendar, meðan 2 avgerðir ikki blivu góðkendar.

Tær 11 bráðfeingis avgerðirnar snúðu seg um 10 ymisk børn í aldrinum 0 – 16 ár. Miðalaldurin var 10 ár. Í trimum málum bleiv barnið tikið úr heiminum/frá foreldrunum innan eina viku eftir føðing. Høvuðsbarnaverndarnevndin góðkendi allar tríggjar bráðfeingis avgerðirnar. Ein av hesum bleiv kærd til Føroya Rætt, sum staðfesti avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Talið av bráðfeingis avgerðum var munandi hægri í 2020 enn undanfarin ár. Árliga vóru í árunum 2017 - 2019 tiknar 4 bráðfeingis avgerðir. Tað er trupult at vísa á nakra orsøk, hví talið av bráðfeingis avgerðum øktist so nógv í 2020.

## BARNAVERNDARØKINI – YMISKT VIRKSEMI

Føroyar eru deildar í 8 barnaverndarøki við tilhoyrandi barnaverndartænastum:

- Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu
- Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar
- Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna
- Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu
- Barnaverndartænastan við Skálafjørðin
- Barnaverndartænastan í VEKS-samstarvinum millum Vestmanna-, Eiðis-, Kvívíkar- og Sunda kommunur
- Barnaverndartænastan í Vágum
- Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur

Tað eru barnaverndartænasturnar, ið leggja mál um t.d. umsorganaryvirtøku fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, ið síðani tekur endaliga avgerð í málunum.

Í alt vóru 92 børn umsorganaryvirtikin og 12 børn vóru í longdari fyriskipan tann 31. desember 2020. Ábyrgdin av málunum viðvíkjandi hesum børnunum var soleiðis deild millum barnaverndartænasturnar[1]:




[1]Ábyrgdin av 3 av teimum 92 børnunum, ið vóru umsorganaryvirtikin, var deild millum tvær barnaverndartænastur – í hagtølunum eru hesi børn tald við fyri báðar barnaverndartænasturnar.

Í 2020 móttók Høvuðsbarnaverndarnevndin 141 tilmælir og bráðfeingis avgerðir til góðkenningar. Hesi vóru býtt soleiðis millum barnaverndartænasturnar[2]:




Høvuðsbarnaverndarnevndin tók 318 avgerðir í 2020. Hesar avgerðir vóru soleiðis býttar millum barnaverndartænasturnar[3]:




[2] Í tveimum av hesum 141 tilmælunum var ábyrgdin deild millum tvær barnaverndartænastur – í hagtølunum eru hesi tilmæli tald við fyri báðar barnaverndartænasturnar.

[3] Ábyrgdin av 6 av teimum 318 avgerðunum var deild millum tvær barnaverndartænastur – í hagtølunum eru hesar avgerðir taldar við fyri báðar barnaverndartænasturnar.

Sum tað sæst er sera stórur munur á, hvussu stórt virksemi er í teimum ymisku barnaverndartænastunum – bæði í mun til móttikin tilmælir og avgerðir.

Ein orsøk kundi verið tann stóri munurin á fólkatalinum í teimum átta barnaverndarøkjunum.

Tað er tó greitt, at tað - hóast hædd verður tikin fyri muninum í fólkatalinum – er sera stórur munur á virkseminum í teimum ymisku barnaverndarøkjunum. Um støðið verður tikið í talinum av avgerðum viðvíkjandi Tórshavnar kommunu í 2020, og hædd verður tikin fyri fólkatalinum (pr. 01.01.2020 sambært Hagstovuni), so áttu t.d. 11 avgerðir at verið tiknar í mun til barnaverndartænastuna fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur, og 39 avgerðir áttu at verið tiknar í mun til barnaverndartænastuna í VEKS-samstarvinum millum Vestmanna-, Eiðis-, Kvívíkar- og Sunda kommunur.

Myndin er tann sama um støðið verður tikið í samlaða avgerðartalinum í 2020, tvs. 318 avgerðir. Um tær 318 avgerðirnar vóru deildar millum barnaverndarøkini í mun til fólkatalið, høvdu tær verið býttar soleiðis:




Høvuðsbarnaverndarnevndin kann ikki vísa á nakra haldgóða orsøk til, hví munurin á virkseminum í teimum ymisku barnaverndarøkjunum er so stórur, sum hagtølini vísa.

## VIÐGERÐARTÍÐ

Í 2020 gingu í miðal 24 dagar frá at tilmæli varð móttikið á Føroya Kærustovni, til Høvuðsbarnaverndarnevndin hevði tikið avgerð í málinum. Tá eru atlit ikki tikin til, at mál til dømis eru móttikin í ferium, ella at foreldur av ymsum orsøkum hava ynskt mál útsett.

Viðgerðartíðin er eitt vet styttri enn í 2019.

Tá mál til Høvuðsbarnaverndarnevndina er móttikið á Føroya Kærustovni, verður tað kannað og viðgjørt av løgfrøðingi, áðrenn tað verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina á fundi, har viðkomandi partar hava møguleika at møta. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur síðani avgerð í málinum, og verður skrivliga avgerðin send viðkomandi pørtum skjótast til ber, oftast í somu viku, sum avgerðin er tikin. Høvuðsbarnaverndarnevndin er saman á fundi 3. hvørja viku.

Tá Høvuðsbarnaverndarnevndin móttekur eina bráðfeingis avgerð frá einari barnaverndartænastu til góðkenningar, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin støðu til bráðfeingis avgerðina innan tveir gerandisdagar - í flestu førum sama dag ella dagin eftir.

## KÆRUR

Kærur um avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini verða lagdar fyri Føroya Rætt. Í 2020 blivu 19 avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini kærdar til Føroya Rætt.

Kæran kann fevna um alla avgerðina ella ein part av avgerðini. Til dømis kunnu foreldur kæra avgerð um samveru, hóast tey ikki kæra avgerð um umsorganaryvirtøkuna.

Tá kæra er móttikin, skipar skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini fyri, at málið verður lagt fyri Føroya Rætt. Føroya Rættur tilnevnir kæraranum advokat í sambandi við rættarmálið.

Úrslitið av viðgerðunum hjá Føroya Rætti av avgerðunum hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini var soleiðis:

| | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Avgerð staðfest | 6 | 8 | 14 |
| Avgerð ikki staðfest | 0 | 0 | 0 |
| Avgerð lutvíst staðfest | 0 | 4 | 0 |
| Kæra tikin aftur av kærara | 1 | 2 | 5 |
| Kæra ikki viðgjørd enn | 2 | 2 | 0 |

Ein dómur, avsagdur av Føroya Rætti, bleiv kærdur til Eystara Landsrætt av kærara.

# 13/KÆRUNEVNDIN HJÁ ARBEIÐSLOYSISSKIPANINI

## NEVNDIN

Í kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini eru tríggir limir. Í nevndini sita:

- Kristina Samuelsen, advokatur og forkvinna
- Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag
- Jón Hestoy, stjóri

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini viðger kærur um avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

## NÝGGJ MÁL

Í 2020 komu 8 nýggjar kærur til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini. Hetta eru nakað fleiri enn í 2019, tá 1 nýggj kæra kom, men færri enn í 2018, tá nevndin móttók 14 kærur. Hækkingin av kærum í 2020 er partvís orsakað av serligu støðuni við COVID-19 og serligu skipanunum, ið eru gjørdar í sambandi við stuðul av mistari inntøku orsakað av COVID-19. Helvtina av innkomnu kærunum hetta árið hava við korona skipanina at gera.




MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## AVGREIDD MÁL

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini hevði 5 fundir í 2020 og avgreiddi 8 mál.




AVGREIDD MÁL SÍÐSTU 3 ÁRINI

## BÝTIÐ AV AVGREIDDUM MÁLUM

| | 2020 |
|---|---|
| Sýtt arbeiðsloysisstuðul | 1 |
| Sýtt frítøku fyri ALS-gjaldi | 1 |
| Afturgjaldskrav | 3 |
| Arbeiðsloysisstuðul skerdur | 1 |
| Sýtt stuðul frá serligu COVID-19 stuðulsskipanini | 1 |
| Hámark av útgjaldinum av arbeiðsloysisstuðli | 1 |
| **Í alt** | **8** |

## AVGREIÐSLAN

Kærunevndin hevur avgreitt 8 kærur hetta árið. Av hesum eru 6 avgerðir staðfestar og 2 kærur fullu burtur, í eina málinum tí ALS gjørdi av at sleppa afturgjaldskravinum, og í hinum tí at ALS tók málið til nýggja viðgerð.




## VIÐGERÐARTÍÐIN

Í 2020 var miðal viðgerðartíðin 4 mánaðir. Hetta er eitt sindur minni enn í 2019, tá var miðal viðgerðartíðin góðar 5½ mánaðir. Mett verður, at viðgerðartíðin á hesum øki er góð, tí atlit mugu takast til krøvini til málsupplýsing og partshoyring. Eisini er trupult at staðfesta nakað yvirskipað í mun til miðal viðgerðartíð, tá talið á málum er so avmarkað.

# Sýtt stuðul frá serligu COVID-19 stuðulsskipanini

## Mál nr. 20/00186

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini viðgjørdi kæru um, at ALS hevði tikið avgerð um at ikki ganga umsókn um stuðul frá serligu COVID-19 stuðulsskipanini á møti.

Í løgtingslóg nr. 25 frá 28. mars 2020 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum broytt við løgtingslóg nr. 96 frá 23. juni 2020, er ásett í § 12a, at sjálvstøðugt vinnurekandi, sum ikki fær rikið sítt virksemi vegna avleiðingar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa spjaðing av COVID-19, og sum teknar trygging móti missi av inntøku av hesum virksemi, hevur rætt til stuðul undir ávísum treytum.

Kærarin, sum var sjálvstøðugur vinnurekandi, greiddi frá, at orsakað av teimum átøkum, sum vórðu sett í verk fyri at basa spjaðing av COVID-19, var hansara tímatal minkað áleið 80% í mun til somu tíð síðsta ár. Kærarin hevði tí sent ALS umsókn um stuðul úr serligu COVID-19 skipanini.

ALS vísti á í avgerð síni, at § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 96 frá 23. juni 2020 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, ásetur, at lógin er galdandi fyri teir persónar, sum vóru í stuðulsskipanini áðrenn 1. juli 2020, og at tá ið lógin varð longd at vera galdandi frá 1. juli til 31. august 2020, var hetta bert fyri tey, sum frammanundan høvdu fingið játtað stuðul. Umsóknir móttiknar 1. juli 2020 og aftaná vórðu av tí orsøk ikki gingnar á møti. ALS vísti á, at ALS hevði móttikið umsóknina frá kæraranum aftaná 1. juli 2020 og at kærarin var sostatt ikki í serligu korona-skipanini 30. juni 2020. Umsóknin var tí ikki gingin á møti.

*Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá ALS.*

# 14/KÆRUNEVNDIN HJÁ BARSILSSKIPANINI

## NEVNDIN

Í kærunevndini hjá Barsilsskipanini eru tríggir limir. Í nevndini sita:

- Kristina Samuelsen, advokatur og forkvinna
- Hans Joensen,
  formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag
- Jón Hestoy, stjóri

## VIÐGERÐARØKIÐ

Kærunevndin hjá Barsilsskipanini viðger kærur um avgerðir hjá Barslisskipanini eftir løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan.

## NÝGGJ MÁL

Føroya Kærustovnur hevur havt um hendi skrivstovuvirksemi hjá Kærunevndini hjá Barsilsskipanini síðan 1. august 2016. Í 2017 komu 7 kærur til Kærunevndina hjá Barsilsskipanina, í 2018 kom ongin kæra, í 2019 var 1 kæra og í 2020 kom heldur ongin kæra til Kærunevndina hjá Barsilsskipanini. Vit hava ikki innlit í virksemið hjá Barsilsskipanini á annan hátt enn at viðgera innkomnar kærur, og er tað tí trupult hjá okkum at meta um orsøkina til fáu kærurnar trý tey seinastu árini.




MÓTTIKIN MÁL SÍÐSTU 4 ÁRINI

## AVGREIDD MÁL

Kærunevndin hevði ein fund og avgreiddi eitt mál í 2020.




## AVGREIÐSLAN

Kærunevndin hevur avgreitt eitt mál hetta árið. Kæran fall burtur, tí at Barsilsskipanin tók málið upp til nýggja viðgerð.

## VIÐGERÐARTÍÐ

Í 2020 var viðgerðartíðin 2½ mánaðir.

Á HEIMASÍÐUNI HJÁ FØROYA KÆRUSTOVNI KANST TÚ LEITA EFTIR AVGERÐUM HJÁ 8 AV KÆRUNEVNDUNUM.

EISINI BER TIL AT SÍGGJA NÆR FUNDUR VERÐUR OG HVØRJI ERU NEVNDARLIMIR.

WWW.FKS.FO

FØROYA KÆRUSTOVNUR ER ÓHEFTUR STOVNUR
UNDIR LØGMANSSKRIVSTOVUNI.

KJARNUUPPGÁVAN ER AT VERA SKRIVSTOVA
HJÁ KÆRUNEVNDUM, SUM VIÐGERA AVGERÐIR
HJÁ ALMENNUM MYNDUGLEIKUM.

STOVNURIN FYRIREIKAR MÁL TIL 11 NEVNDIR.

Føroya Kærustovnur · Undir Hornabakka · Postsmoga 45 · 110 Tórshavn
Tel. 32 05 85 · fks@fks.fo · www.fks.fo